| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. september 2022 | Blað nr.: 758 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 29. september 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 194/22 – 217/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>29. september 2022 | Blað nr.: 759<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 194/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 761 |
| 195/22 | 22/04569-3 | Keyp matr.nr. 151a, Kirkjubøur - Argir. | 763 |
| 196/22 | 19/00046-7 | Matr.nr. 255cr, Kirkjubøur - Argir. Eigari heitir á kommununa um at keypa stykkið aftur. | 765 |
| 197/22 | 22/04885-3 | Yvirtøka av leigumáli í matr.nr. 230y, Kollafjørður. | 767 |
| 198/22 | 22/05008-1 | Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs | 769 |
| 199/22 | 22/03066-1 | Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum | 771 |
| 200/22 | 22/03811-1 | Gøtunavnanevndin : Atkomuvegurin til maskinhøllina í Húsahaga og Vatnverkið í Villingardali | 775 |
| 201/22 | 22/04672-1 | Fíggjarstøða Musikkskúlin | 777 |
| 202/22 | 14/00417-16 | Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak | 780 |
| 203/22 | 22/02516-3 | Umsókn um broytan av byggisamtyktini á matr. nr. 8a og 8d, Kirkjubø í sambandi við verkætlan | 790 |
| 204/22 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 794 |
| 205/22 | 22/02144-1 | Skeltisreglugerð | 798 |
| 206/22 | 21/00642-6 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið har nýggja bakaríið skal byggjast matr. nr. 322 og 323, Tórsgøta/Sverrisgøta, Tórshavn | 804 |
| 207/22 | 22/02494-1 | Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu | 810 |
| 208/22 | 22/04630-1 | Eykajáttan til nýggja maskinu til vegamerking | 813 |
| 209/22 | 22/02807-2 | Avtalu millum Kommunalu Brennistøðina á Hjalla (KB) og Fjarhitafelagið (FHF) | 816 |
| 210/22 | 19/00083-1 | Bátahylur í Álakeri | 818 |
| 211/22 | 16/00212-1 | Bátahylur við Sjógv. Umlegging frá teymum til bátabrúgvar | 829 |
| 212/22 | 19/00107-1 | Bátahylur í Kaldbaksbotni | 832 |
| 213/22 | 20/00001-1 | Bylgjubrótari til bátahylin við Sjógv í Kollafirði | 835 |
| 214/22 | 22/02186-1 | Broyting í reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu | 837 |
| 215/22 | 22/04383-2 | Havnar Róðrarfelag - Umsøkn um Grundøki til bátahøll. | 846 |
| 216/22 | 22/04851-1 | Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna | 849 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 217/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 855 |

**Til viðgerðar**

## 194/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 178/22 | 22/00011-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 194/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. september 2022 | Blað nr.: 762 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 195/22 Keyp matr.nr. 151a, Kirkjubøur - Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 233/22 | 22/04569-3 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 195/22 | 22/04569-3 |

**Upprunin til málið.** Eigarar til matr.nr. 151a, bjóða kommununi ognina til keyps fyri kr. 50.000,00

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 151a, Tórshavn. Tinglýstur eigari. Argja Kommuna og privatur persónur. Arvingar, heita á kommununa um at keypa teirra helming av matriklinum, og vísa til, at Argja kommuna í 1989, keypti helmingin av matriklinum, fyri kr. 50.000,00 kr. og bjóða tey kommununi " hin " helmingin til keyps fyri kr. 50.000,00

Matrikkulin er atkoma til ymiskar matriklar sum liggja framvið Hagagøtu. Sí kortskjal skjal nr. 22/04569 – 2. Tórshavnar kommuna er frammandundan tinglýstur eigari av granna matrikklunum. Matr.nr. 156b. ( Hagagøta ) og matr.nr. 156k ( Vendipláss ovast í Hagagøtu )

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6175 | L61020 | Keyp av jørð |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 51.500,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa helmingin av matr.nr. 151a, Kirkjubøur – Argir fyri kr. 50.000,00 + útreiðslur til tinglýsing kr. 1.500,00, soleiðis at samlaður kostnaður íroknað útreiðslur til tinglýsing verða kr. 51.500,00 fíggja av keyp/sølu konto 6175.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 196/22 Matr.nr. 255cr, Kirkjubøur - Argir. Eigari heitir á kommununa um at keypa stykkið aftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 234/22 | 19/00046-7 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 196/22 | 19/00046-7 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur boðað frá, at hann ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**

**Grundstykki matr.nr.** 255cr, Kirkjubøur – Argir. Vídd 400m2. Grundstykkið er grovplanerað. Útstykking Klingurstjørn 2.
Keypsprisur kr. 621.600,00
Skeyti tinglýst 07.04.2020.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. Desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn. Tinglýstir servitutttir. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6175 | L61020 | Keyp av jørð | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 621.600,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Kommunan keypir stykkið innaftur fyri kr. 621.600,00 sum er sama upphædd. sum kommunan seldi til verandi eigara.

Sambært skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í samband við afturskeytan, og rindar verandi eigari tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

Tá ið kommunan hevur ognað sær grundstykkið, verður tað í fyrsta lagi bjóða møguligum umsøkjara til grundstykkið, sum hevði teknað seg til luttøku, tá ið útstykkingin á fyrsta sinnið varð útlutað, og í øðrum lagi verður grundstykkið selt í fríðari sølu.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at keypa stykkið aftur fyri kr. 621.600,00
Seljari rindar tinglýsingarútreiðslur.

Tá ið kommunan er tinglýstur eigari av stykkinum, verður stykkið selt soleiðis.

1. Stykkið verður bjóðað umsøkjara sum var við í upprunaligari tillutan í útstykking Klingurstjøn 2, men sum enn ikki hevur fingið grundstykki tillutað.
2. Um stykkið ikki verður selt sí punkt 1, verður stykkið selt í fríðari sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot, har mælt verður býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini við teirri broyting, at pkt. 2 verður tikið úr samtyktini.

Broytingaruppskotið einmælt samtykt.

# 197/22 Yvirtøka av leigumáli í matr.nr. 230y, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 235/22 | 22/04885-3 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 197/22 | 22/04885-3 |

**Upprunin til málið.** Sakførari, heitir á kommununa um, at góðkenna nýggjan leigara til matr.nr. 230y, Kollafjørður.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 230y, Kollafjørður. Kommunan eigur matrikkulin, meðan ábygda neystið er privatogn. Verandi eigarar hava við skeyti selt ábygda neystið, og søkir sakførari nú um, at nýggir eigarar av neystinum kunnu taka yvir verandi leigusáttmála til somu treytir sum verandi leigusáttmáli.

Verandi sáttmáli er dagfestur 27.01.2015, og kann sambært § 1, um sáttmálin ikki verður mishildin, ikki sigast upp av eigaranum, fyrrenn 18 ár eru ligin frá tí degi, leigumálið tók við. Tá hetta tíðarskeiðið er farið, kann sáttmálin sigast upp av báðum pørtum við eitt ára freist til ein 1. Januar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna nýggjan leigara til matr.nr. 230y, Kollafjørður. Verandi leigusáttmáli verður áteknaður og undirskrivaður av nýggjum leigarum, men verður annars óbroyttur galdandi í øllum orðum og setningum tess.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 198/22 Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 237/22 | 22/05008-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 198/22 | 22/05008-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarstjórin

**Lýsing av málinum**
Eftir áheitan frá borgarstjóranum hevur umsitingin gjørt reglugerð um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs, ið er heiðurstekin, ið ætlandi skal latast starvsfólki, ið hava verið í tænastu hjá Tórshavnar kommunu í 30 og 40 ár umframt borgarum, ið hava sýnt serligt hegni ella hava laðað týðandi varðar eftir seg á lívsleiðini.

Starvsfólk fáa eftir 30 ára tænastu silvurheiðurstekin Tórshavnar býráðs, og eftir 40 ára tænastu verður gullheiðurstekin Tórshavnar býráðs latið. Teimum, sum í virki sínum á serligan hátt hava slóðað fyri og hava verið góðar fyrimyndir hjá øðrum, verður latið gullheiðurstekin Tórshavnar býráðs.

Borgaranum verður latið eitt heiðurstekin umframt eitt heiðursbræv, sum í stuttum lýsir, hví heiðurin verður latin.

Heiðursteknið er runt merki við búmerki Tórshavnar kommunu og við áskriftini *Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs*. Heiðursteknið er knýtt í klædnastykki í hvítum, reyðum og bláum.

Tað er umsitingin, sum kemur at umsita reglugerðina um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna uppskotið til reglugerð um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við reglugerðini, við tí broyting at reglugerðin eisini er galdandi fyri býráðslimir. Somuleiðis fáa borgarstjórar handað heiðursmerkið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Borgarstjórin legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at serlig reglugerð verður gjørd fyri borgarar.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Tróndur Sigurðsson, Jákup Dam og Ruth Vang.

## 199/22 Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 181/22 | 22/03066-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 136/22 | 22/03066-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 236/22 | 22/03066-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 199/22 | 22/03066-1 |

**Upprunin til málið**
Felags áhugamál millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið.

**Lýsing av málinum**
Síðani Skúlin á Fløtum flutti úr bygningunum á Frælsinum hevur samskifti við millumbilum verið millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýri um, hvat bygningarnarnir á Frælsinum, ið eru samogn millum landið og kommununa, skulu brúkast til.

Partur av hesum samskiftið hevur snúð seg um skúlabygningin í Hoydølum, ið somuleiðis stendur tómur.

Í eini roynd at finna eina loysn á fleiri avbjóðingum undir einum, eru Tórshavnar kommuna og Mentamálaráðið komin ásamt um at leggja fram eina makaskiftisloysn, ið loysir hølistrupulleikarnar hjá bæði landsmyndugleikunum og kommununi og letur upp fyri, at sjøtul kann setast á stóru campus-verkætlanina hjá Fróðskaparsetrinum á Frælsinum.

Fróðskapasetur Føroya heldur í dag til í fleiri bygningum, eitt nú í Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar kommunu. Ein ætlan um at savna Fróðskaparsetrið í einum campus-øki á Frælsinum hevur leingi verið í umbúna.

Samstundis hevur kommunalt politiskt ynski verið frammi um at savna alla fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu á einum stað.

Við at flyta Fróðskaparsetrið úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum og út í bygningarnar á Frælsinum og við at flyta fyrisitingina hjá kommununi úr mongu bygningunum í miðbýnum og út í Sjóvinnuhúsið, verða atlit tikin til ynskini hjá bæði Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrinum.

Tórshavnar kommuna eigur 40% av bygninginum og økinum á Frælsinum, og landið eigur hini 60 %. Harumframt eigur Tórshavnar kommuna 100% av lon 4, ið er sambygd restina av bygningunum á Frælsinum.

Í eini avtalu, ið samstundis er ein makaskiftisavtala, er ætlanin at lata landinum ognarrættin á teimum 40% av samognini á Frælsinum umframt alla lon 4, móti at kommunan fær gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, og at kommunan samstundis gerst leys av einum gávulyfti, ið Tórshavnar býráð í 1990 gav Fróðskaparsetrinum um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

Avtalan inniber somuleiðis, at Fróðskaparsetrið fer úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum skjótast gjørligt og í seinasta lagi við ársenda 2024.

Avtalan er somuleiðis treytað av, at Løgtingið góðkennir avtaluna millum partarnar, og at Løgtingið setir neyðuga peningin av til at umvæla bygningarnar á Frælsinum eftir eini nærri ásettari ætlan.

Tórshavnar kommuna treytar sær við makaskiftavtaluni, at bygningarnir á Frælsinum verða til almenn útbúgvingar- og granskingarendamál hjá Fróðskaparsetur Føroya, og/ella sum lestraríbúðir.

Føroya Landsstýri treytar sær við makaskiftisavtaluni, at ræðisavmarkandi byrður kunnu verða lýstar á ognina í Hoydølum, undir hesum, at ognin einans skal kunna nýtast til almannagagnligt virksemi hjá Tórshavnar kommunu og forboð móti sølu ella avhendan av ognini.

Við at taka undir við omanfyristandandi prinsippavtalu, taka býráðið ávikavist Føroya Landsstýrið undir við, at farið verður undir eina tilgongd at fremja ætlaðu felagsloysnina. Hetta inniber millum annað, at bygningarnir á Frælsinum og í Hoydølum og lendið, ið kommunan lat sum gávu í 1990 verður virðismett av óheftum ognarmeklara, so eitt makaskifti kann gerast, ið tekur hædd fyri virðunum, ið báðir partar lata og fáa við ætlaða makaskiftinum.

Farið verður eftir ætlan undir hetta arbeiðið beinanvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Principavtala dagførd 20. juni 2022 – Við dagføringum, j.nr. 22/03066-2
Skjal 3 - Leigusáttmálin SVH, j.nr. 22/03066-3
Skjal 2 - Býráðssamtykt 1990 o.a., j.nr. 22/03066-3
Skjal 4 - Kostnaður – Sjóvinnuhúsið, j.nr. 22/03066-3
Skjal 6 - Íløguætlanin, j.nr. 22/03066-3
Skjal 1 - Yvirlit yvir lendistørvi, j.nr. 22/03066-3
Skjal 5 - Servituttur á matr. nr. 18 Hoyvík, j.nr. 22/03066-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýrið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av samtyktini á býráðsfundi 22. juni 2022 hava Tórshavnar kommuna og Uttanríkis- og mentamálaráðið heitt á óheftan meklara um at meta um virðið á ognunum, ið ætlanin er at makaskifta.

Meklarafyritøka hevur mett virði á tí partinum av ognini á Venjingarskúlanum, ið er felags ogn til 79.700.000 kr.

Kommununnar patur, ið er 40% av ognini, er sostatt mettur til 31.908.000 kr.

Lon 4, ið stendur á matr. nr. 1031a, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er mett til 13.000.000 kr.

Viðvíkjandi bygningunum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í Hoydølum er skúlabygningurin, ið stendur á matr. nr. 19, mettur til 32.500.000 kr.

Lonirnar, ið standa á matr. nr. 18 í Hoydølum, eru virðismettar til 4.500.000 kr. Talan er um lonir, ið kunnu takast sundur og flytast av økinum. Hesar hýsa í dag dagstovnavirksemi og eitt serskúlatilboð hjá Tórshavnar kommunu og hava tær tíðaravmarkað loyvi frá Yvirfriðingarnevndini at standa á lendinum í Hoydølum inntil ársskiftið 2023/24.

Í tilgongdini síðani prinsippavtalan millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið varð samtykt í býráðnum 22. juni 2022, eru partarnir vorðnir samdir um at avgreiða viðurskiftini sína millum sum avtalur um keyp og sølu heldur enn við makaskiftisavtalu.

Mett verður, at hesin leistur er minni drúgvur at koma á mál við enn leisturin við makaskifti. Hesin leistur krevur fyri kommununnar viðkomandi bert býráðsins góðkenning og skal ikki eins og ein makaskiftisavtala góðkennast av kommunala eftirlitinum hja Úmhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Partarnir hava tí endurskoðað prinsippavtaluna sína millum og verður hendan hervið løgd fyri býráðið til støðutakan.

Sambært endurskoðaðu prinsippavtaluni keypir Uttanríkis- og mentamálaráðið kommununnar lut av felagsognini á Frælsinum og lon 4, ið kommunan í dag eigur einsamøll.

Kommunan keypir gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, lonirnar, sum í dag hýsa dagstovnavirksemi og serskúlatilboði hjá Tórshavnar kommunu og undirlendið undir hesum bygningum, ið verður frábýtt til egið matrikulnummar og verður til víddar uml. 12.500 m².

Við avtaluni verður Fróðskaparsetrið uppsagt úr leigumáli sínum í Sjóvnnuhúsinum, og flytir Fróðskaparsetrið stigvíst úr bygninginum, til alt virksemið er flutt úr húsinum við árslok 2024. Fyri at siga sáttmálan upp í úrtíð verður rindað eitt endurgjald áljóðandi 4.200.000 kr. fyri part av teimum íløgum, Fróðskaparsetrið hevur gjørt í leigumálið í leigutíðarskeiðinum.

Eisini inniber avtalan partanna millum, at Tórshavnar kommuna tekur aftur og er leys av gávulyftinum, ið Tórshavnar býráð gav Fróðskaparsetrinum í 1990 um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

At enda inniber prinsippavtalan, at Uttanríkis- og mentamálaráðið rindar Tórshavnar kommunu 1.854.000 kr. til tess at gera upp fyri munin millum virðið á omanfyri nevndu ognum á Frælsinum og í Hoydølum.

Fyriliggjandi prinsippavtala slóðar fyri, at Fróðskaparsetrið kann fara undir tilgongdina at umvæla, menna og flyta inn í eitt nýtt kampus á Frælsinum, og at Tórshavnar kommuna fær ræði á Sjóvinnuhúsinum og ognunum í Hoydølum til framtíðar kommunal endamál.

Fíggjarliga hevur prinsippavtalan ikki beinleiðis útreiðslur við sær fyri kommununa. Kommunan fær, tá ið øll viðurskifti sambært avtaluni eru komin upp á pláss, eina eingangsupphædd áljóðandi 1.854.000 kr. frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og er hetta einasta ítøkiliga peningaflyting, sum avtalan hevur við sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og Trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi, endurskoðaða uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. september 2022 | Blað nr.: 775 |
| | Formansins merki: |

## 200/22 Gøtunavnanevndin : Atkomuvegurin til maskinhøllina í Húsahaga og Vatnverkið í Villingardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 23.08.2022 | 6/22 | 22/03811-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 190/22 | 22/03811-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 200/22 | 22/03811-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við uppruddning og skráseting av kommunalum bygningum í GIS skipanini, ynskir Tekniska umsiting at upprætta adressur til m.a. hesar bygningar:

- Maskinhøllina í Húsahaga
- Vatnverkið í Villingadali

Fyri at kunna gera hetta krevst, at atkomuvegurin til hesi støð hevur eitt navn.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

| | Býráðsfundur<br>29. september 2022 | Blað nr.: 776<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Gøtunavnanevndin 23. august 2022:** Nevndin mælir til gøtunavnið «undir Húsareyni».

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 201/22 Fíggjarstøða Musikkskúlin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 188/22 | 22/04672-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 219/22 | 22/04672-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 201/22 | 22/04672-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 22/04672-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarárið 2021 hevði Musikkskúlin eina samlaða meirnýtslu uppá tkr. 2.548, svarandi til 29%. Av hesum vóru tkr. 633 meirnýtsla frá 2019, ið eisini var fyrsta fulla rakstrarárið í nýggja musikkskúlabygninginum.

Tað er í st.kt. viðlíkahald v.m., at nógv størri nýtsla er enn játtað – tilsamans tkr. 1.325, sí meira niðanfyri.

St.kt. 73 flyting til landið, tað er kommununnar partur av musikkskúlalæraralønum, hevur eisini stóra meirnýtslu uppá tkr. 516. Tað merkir, at Musikkskúlaskipanin (landið) hevur latið Musikkskúlanum fleiri undirvístingartímar enn kommunan hevur játtað i fíggjarætlanini. Sama støða var í 2020, har munurin er tkr. 377. Hesi bæði ár hevur skúlin sostatt eina meirnýtslu uppá tkr. 893, tí fíggjarætlanin hevur verið ov lágt sett hesum viðvíkjandi. Játtanin hjá Musikkskúlaskipanini er ikki kend fyrr enn beint undan jólum, tá fíggjarløgtingslógin er samtykt, og tá hendir, at játtanin er broytt í mun til tað, sum kommunan hevur samtykt í november.

Økta virksemið sæst eisini aftur í, at inntøkurnar í 2021 eru tkr. 193 hægri enn fíggjarætlanin legði upp til.

Viðv. stóru útreiðslunum í viðlíkahald, tvs. í nýggja bygningin, so hevur metingin hjá skúlans leiðslu verið, at nógvir átrokandi manglar máttu gerast, skuldi skúlin virka, men sum játtan tó ikki var til. Nevnast kann fuktarar, sum tryggja at ljóðførini ikki oyðileggjast eins neyðuga luftvætu fyri tey fólk, sum inni eru, hetta vegna feil í ventilatiónsskipanini. Fleiri ljóð- og ljósskipanir máttu umvælast, og enn er Hátún ikki á tí tøkniliga støði, sum ynskiligt var. Stikkkontakir manglaðu nógvastaðni, og fyri at fáa undirvísingina at bera til, hevur skúlin verður noyddur at seta í verk eyka el-arbeiði. Elektronisku lásini er eisini bøtt uppá. Korona hevði eisini ávirkan á útreiðslurnar osfr.

Fyri brúkið í bygninginum hevur verið avbjóðandi, at bygningurin vísti seg at hava nógvar manglar og lýti, harav partar enn eru í einum tryggingarósemju við ráðgevan, og sum eisini er tyngjandi fyri dagliga virksemið.

Framroknað er væntandi, at raksturin í 2022 hvílur nøkulunda í sær sjálvum, tó burtursæð frá framfluttu meirnýtsluni. Um inntøkurnar halda og flyting til landið er sbrt fíggjarætlanini, kann roknast við, at meirnýtslan við ársenda 2022 er lækkað niður á tkr. 2.180. Tað er tí ikki sannlíkt, at rakstrarstaðið kann arbeiða hesa upphædd niður komandi 3 árini uttan at skerja virksemið.

Um eykajáttan verður latin til tær tkr. 893, sum er ósamsvarið millum játtanina hjá kommununi og staðfestu musikkssskúlalønirnar til landið, verður meirnýtslan uml. tkr. 1.287. Eisini henda upphæddin er avbjóðandi hjá musikkskúlanum at fáa burtur eftir trimum árum, sum ásett í játtanarreglunum, uttan at tað gongur út yvir virksemið.

| | **Býráðsfundur**<br>29. september 2022 | Blað nr.: 778<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Til tess at fíggja hetta verður mett, at til ber at at játta tkr. 1.500 av kontu 5510 Tórshavnar býarsavn, sum hevur minninýtslu í 2022, og tkr. 700 av løgukontu 5275 Tórshavnar kvøldskúli løgukarmur LK52002 Kvøldskúlin, tvs. tilsamans tkr. 2.200.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Játtanarereglur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: Deild | Verk-ætlan | Navn | Játtast á: Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5510<br>5275 | | Býarsavnið kr. 1.500.000<br>Kvøldskúlin kr. 700.000 | 5110 | | Musikkskúlin | | 2.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta tkr. 1.500 av kontu 5510 Tórshavnar býarsavn og tkr. 700 av løgukontu 5275 Tórshavnar kvøldskúli løgukarmur LK52002 Kvøldskúlin, tvs. tilsamans tkr. 2.200, til kontu 5110 Musikkskúlin sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Ein meiriluti: Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna W. Poulsen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Annika Olsen og Ruth Vang atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Gunvør Balle

Blankt atkvøddu: Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

## 202/22 Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 8/14 | 14/00417-16 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 61/15 | 14/00417-16 |
| 3 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 151/15 | 14/00417-16 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 57/16 | 14/00417-16 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 5/16 | 14/00417-16 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 100/16 | 14/00417-16 |
| 7 Kaldbaksnevndin | 24.10.2016 | 8/16 | 14/00417-16 |
| 8 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 248/16 | 14/00417-16 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 312/16 | 14/00417-16 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 2/17 | 14/00417-16 |
| 11 Kaldbaksnevndin | 25.10.2017 | 8/17 | 14/00417-16 |
| 12 Kaldbaksnevndin | 04.04.2018 | 2/18 | 14/00417-16 |
| 13 Kaldbaksnevndin | 04.09.2018 | 6/18 | 14/00417-16 |
| 14 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 281/19 | 14/00417-16 |
| 15 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 273/19 | 14/00417-16 |
| 16 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 248/19 | 14/00417-16 |
| 17 Kaldbaksnevndin | 19.11.2019 | 8/19 | 14/00417-16 |
| 18 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 14/00417-16 |
| 19 Kaldbaksnevndin | 13.02.2020 | 2/20 | 14/00417-16 |
| 20 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 115/21 | 14/00417-16 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 121/21 | 14/00417-16 |
| 22 Kaldbaksnevndin | 28.09.2021 | 5/21 | 14/00417-16 |
| 23 Mentamálanevndin | 15.12.2021 | 293/21 | 14/00417-16 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 49/22 | 14/00417-16 |
| 25 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 49/22 | 14/00417-16 |
| 26 Kaldbaksnevndin | 02.03.2022 | 2/22 | 14/00417-16 |
| 27 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 37/22 | 14/00417-16 |
| 28 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 91/22 | 14/00417-16 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 76/22 | 14/00417-16 |
| 30 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 64/22 | 14/00417-16 |
| 31 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 139/22 | 14/00417-16 |
| 32 Kaldbaksnevndin | 13.06.2022 | 4/22 | 14/00417-16 |
| 33 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 197/22 | 14/00417-16 |
| 34 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 222/22 | 14/00417-16 |
| 35 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 202/22 | 14/00417-16 |

**Málslýsing:**

**<u>Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak</u>**

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Nevndin ynskir at fáa eina fimleikahøll til skúlan, sum eisini kann brúkast til ítrótt, ítriv og sum borgarahús.

**Kaldbaksnevndin 24. november 2010:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Ynski er framhaldandi um at fáa eina politiska viðgerð av málinum, við tí fyri eyga at fáa málið raðfest á eini langtíðaríløguætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at heita á umsitingina um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felags hølum í bygdum kommununnar.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið áheitan um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felagshúsum í bygdum kommununnar. Bygdirnar Kaldbak, Nólsoy og Velbastað eru ymiskt fyri í mun til innandura ítróttaumstøður og almenn felags- ella bygdahús, sum ikki eru átrúnaðarlig samkomuhús. Harumframt eru kommunalir skúlar og dagstovnar.

Í nógvum bygdum verða felagshús nýtt til størri samkomur so sum brúdleyp, ervi, føðingardagar, bygdastevnur o.a.. Hesi felagshús eru oftast skipað av einum felag, tað veri seg bygdafelag, ítróttafelag, dansifelag osfr., sum eigur og rekur húsið, aloftast við sjálvbodnari megi. Í Havn eru nøkur kommunal býlingshús, sum í ávísan mun hava somu funktiónir.

Á Velbastað er felagshús, men eingin fimleikahøll. Í Nólsoy er felagshús og ein lítil fimleikahøll í skúlanum. Harumframt stendur ein grund til svimjihyl. Í Kaldbak er eingin fimleikahøll og einki felagshús.

Umsitingin skilur áheitanina soleiðís, at ynskt verður tilfar til víðari støðutakan um ætlan at byggja ella betra um felagsumstøður til innandura ítrótt og fjøltáttað felags tiltøk og virksemi í nevndu bygdum.

Til tess skal gerast ein tørvsgreining. Harumframt er neyðugt við uppskotum til, hvussu hetta best kann loysast í ymsu bygdunum í mun til funktiónir, og hvussu hetta í skitsum kundi tikið seg út, har talan er um at byggja nýtt. Gerast skal meting um íløgutørv og eftirfylgjandi rakstrarkostnað. Eisini er neyðugt at fáa lýsing av, hvussu verandi felagshús og karmar annars eru skipaði í dag – privat og kommunalt, og uppskot til, hvussu hetta eigur at verða skipað í framtíðini eisini við atliti at, hvussu hetta er skipað aðrastaðni í kommununi.

Sum tað áður er gjørt vart við, so er eingin játtan sett av á íløguætlanini til hetta endamál. Mett verður neyðugt at fáa uttanhýsis ráðgeving at standa fyri omanfyri lýstu tørvsgreining. Mett verður, at hóskandi upphædd er kr. 300.000. Skal tørvsgreiningin fremjast eftir hesum leisti, er neyðugt at flyta játtan frá øðrum verkætlanum. Uppskot er at flyta játtan frá ætlanini at byggja svimjifelagnum felagshøli L57009, tí mett verður, at hetta kann takast við í ætlanina at byggja nýggja svimjihøll L57015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000 til felagshús í bygdum kommununnar av íløgukontu 5775 ítróttaanlegg, L57009 svimjifelagið hølir.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Borgarstjórin kunnaði um, at málið er viðgjørt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini, har tað verður mælt býráðnum til at játta kr. 300.000 til at gera tørvsgreining viðvíkjandi felagshúsum í bygdum kommununnar.

Staðbundnu limirnir hildu ikki, at tørvur var á tørvsgreining, men at peningurin heldur skuldi verið brúktur til at gera høllina í Kaldbak.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Jan Christiansen ynskti at fáa soljóðandi broytingaruppskot *ført í protokol: Jan Christiansen mælir til at samtykkja at taka undir við býráðnum 13. september 2012, men at játtanin verður brúkt til gerð av fimleikarhøll í Kaldbak.*

*Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.*

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Kaldbaksnevndin 3. desember 2012:** Borgarstjórin kunnaði um støðuna í málinum**.**

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu gongur við arbeiðinum.

**Kaldbaksnevndin: 20. februar 2013:** Borgarstjórin kunnaði um at málið liggur í mentamálanevndini. Rykt verður eftir málinum viðv. fimleikahøll í Kaldbak.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Málið varð umrøtt og útsett. Semja varð um at viðgera málið saman við framtíðar íløguætlanini.

**Kaldbaksnevndin 27. november 2013:** Nevndin heitir á mentamálanevndina um at taka málið uppaftur soleiðis at gongd kann koma á málið.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini. Vísandi til býráðsamtyktina 1. november 2012 eigur støða at takast til, hvørt arbeiði skal setast í gongd fyri nevndu játtan.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at gera tørvslýsing viðvíkjandi trivnaðar/-virksemishúsum í nevndu bygdun fyri játtaðu upphæddina.

**Kaldbaksnevndin 26. februar 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kemur á fundin at greiða frá tørvskanning.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kunnaði um tørvskanningina.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge biður um at fáa málið á skrá.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Málið varð umrøtt og verður sett á skrá ein av komandi fundum.

**Ískoyti:**
Til tess at gera eina fimleikahøll í Kaldbak er neyðug við meiri lendi. Talan er um lendi í bólki B í byggisamtyktini fyri Kaldbak, og kann nýtslustigið ikki fara upp um 0,30. Verandi lendi hjá skúlanum er ov tepurt, og er tí neyðugt at fáa meiri lendi til vega til at byggja á og til parkeringspláss. Mest upplagt er at fáa lendi til vega vestanfyri Kaldbaks skúla framvið Krossgøtu og í øðrum lagi norðanfyri skúlan. Talan er um lendi í bólki D í byggisamtyktini, har nýtslustigið ikki má fara uppum 0,30. Leysliga mett verður ein komandi fimleikahøll umleið 400 m$^2$, alt eftir hvussu bygt verður og møgulig sambygging við skúlan.
Tí verður mett neyðugt at útvega umleið 1500 m$^2$ av lendi. Talan er um landsjørð og skal tí samráðast við Búnaðarstovuna um málið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna um at ogna sær umleið 1500 m$^2$ lendi til fimleikahøll og venda aftur við einum avtaluuppskoti. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
Mentamálanevndin 02. marts 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Búnaðarstovuna um lendi í bygdini. 29. september 2016 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Búnaðarstovuni við fyribils tilsøgn um lendi til ynskta endamálið.

Víddin sum partarnir eru komnir ásamt um eru 1700 m². Hetta var mett sum mest upplagda støddin í mun til økið, lendið vm.

Samlaði kostnaðurin fyri lendið verður kr. 215.915.

Á projektkonto L57018 eru kr. 300.000 tøkar til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka av tilboðnum á kr. 215.915 sum lýst í fyribils tilsøgnini frá Búnaðarstovuni dagfest 29. september 2016. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eyka ískoyti:**
Eftir at fyrra tilmælið var skrivað og tilsøgn komin frá Búnaðarstovuni, hevur bóndin/festarin mótmælt ætlanini vestanfyri og mælir til lendið norðanfyri í staðin og um tað ikki verður gjørt fer hann at kæra málið til landbúnaðarstevnu. Bóndin sigur at lendið vestanfyri er góður maskinbøur og tískil ein missur fyri sláttur.

Umsitingin er í holt við at finna fram til staðseting og stødd á einum stykkið norðanfyri og kann til ein fund í heyst fund helst verða komin á mál ella áleiðis við samráðingunum um tað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálnevndini til at halda fast við at keypa lendið vestanfyri og í øðrum lagi at umsitingin fær til vega uppskot til loysn norðanfyri skúlan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Vegna brákomnar nýggjar upplýsingar í málinum, tekur ein minniluti, Jógvan Arge, støðu á seinni fundi

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast um at keypa lendið vestanfyri.

**Kaldbaksnevndin 24. oktober 2016:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umboð frá umsitingini koma inn at greiða frá málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Borgarstjórin mælir til at taka ein fund við bóndan og kaldbaksnevndina á einum eykafundi.

**Kaldbaksnevndin 25. oktober 2017:** Økissamskiparin og onnur hava havt fund við bóndan, men hann vil ikki selja. Arbeitt verður víðari við somu loysn og øðrum alternativum.

**Kaldbaksnevndin 04. apríl 2018:** Borgarstjórin heldur at arbeiðast skal við at ognartaka økið innan fyri skúlan.

**Kaldbaksnevndin 04. september 2018:** Umboð frá løgdeildini og mentamáladeildini greiddu frá málinum og seta seg í samband við festaran  skjótast gjørligt og kanna eftir um eitt e.v.t. makaskifti.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur givið kommununi tilsøgn um keyp av lendi vestan fyri skúlan. Talan verður um at keypa uml. 1.000 $m^2$. Mettur keypsprísur íroknað frábýtingar-útreiðslur, sakargjald og tinglýsing er uml. 135 tkr.
Festarin missir gott dyrkilendi og leggur upp til, at hann fær eitt endurgjald, sum hann kann brúka til at velta annað lendi.
Búnaðarstovan hevur saman við festara gjørt eina veltiætlan av lendi, sum umfatar umvælingar í bønum á matr. nr. 22a, Kaldbak. Talan er um bøin oman fyri koyrivegin oman fyri kirkjuna og nýggja kirkjugarðin.

Mettur kostnaður uml. 44 tkr.

Samlaður kostnaður fyri keyp og endurgjald verður tá uml. kr. 180 tkr.

Fígging
Í máli 14/02822 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu samtykti mentamálanevndin í ár at játta 305 tkr. til útiøkið hjá skúlanum og í fjør 50 tkr. Av hesi upphædd eru uml. 322 tkr. ikki nýttar enn. Samstundis er komið eitt gott spælipláss í bygdini skamt frá skúlanum. Tí metir umsitingin, at spæliplássverkætlanin tolir, at 180 tkr. verða umraðfestar til útvegan av lendinum til fimleikahøll. Skúlaleiðarin í Kaldbaks skúla tekur undir við málinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at møgulig útvegan av lendi v.m. kann rindast av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Kaldbaksnevndin 19. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nú 180 tkr. eru játtaðar til keyp av lendi vestan fyri Kaldbaks skúla til fimleikahøll til skúlan, verður biðið um heimild at seta arbeiðsbólk at gera byggiskrá fyri fimleikahøll á uml. 400 $m^2$. Ætlanin er at seta arbeiðsbólkin í vár, og at byggiskráin so verður liðug í heyst.

Skotið verður upp, at arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboði fyri Býarskipanardeildina, umboði fyri Mentamáladeildina, umboði fyri Kaldbaksnevndina og skúlaleiðaranum í Kaldbaks skúla.

Í løguætlanini er roknað við, at til fimleikahøll til Kaldbaks skúla verða játtaðar 7 mió kr. í 2021 og 3 mió kr. verða játtaðar í 2022, haraftrat eru 180 tkr. játtaðar til lendið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta arbeiðsbólk at gera byggiskrá til fimleikahøll til Kaldbaks skúla og at senda málið í kaldbaksnevndina til ummælis.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 13. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur støðu til hvør skal í arbeiðsbólkin og venda aftur við hesum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeidin hevur boðað frá, at vegna raðfestingar er best um partur av byggiskránni verður gjørdur av uttanhýsis ráðgeva. Mett verður at umsitingin kann gera part av byggiskránni saman við fyrirreikingarbólkinum, meðan tann tekniski parturin má gerast í samstarvi við fólki við tekniskari bakgrund.

Mett verður hóskandi at fáa hjálp frá uttanhýsis ráðgeva. Mett verður hóskandi at seta av upp til 150 tkr. til uppgávuna. 400 tkr. eru tøkar á projektkontu L57018 Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak.
Á løgukarminum konta 5775 fyri 2021 eru avsettar 1.000 tkr. til Fimleikahøll í Kaldbak.

Viðv. størri lendi
Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini ynskir at fáa víðkað um lendið til verkætlanina, soleiðis at tað ber til frá byrjan av at taka hædd fyri møguligari framtíðar kommunalari bygging í økinum. Formaðurin mælir til at víðka økið við umleið 1500 m2 lutvíst vestureftir og lutvíst norðureftir frá verandi lendi.

Meting hjá umsitingini
Sum heild metir umsitingin at tað er skilagott at fáa víðkað um møguleikarnar fyri framtíðar kommunalari bygging í økinum, og soleiðis í betri mun kunna ráðleggja eina skynsama heild.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um gerð av byggiskrá.
b). at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna og festara um møguleikar fyri keypi av 1500 $m^2$ afturat.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 28. september 2021:** 5. mió.kr. eru settar av á uppskotinum til fíggjarætlanina í næsta ár. Arbeiðið fer í gongd í næsta ár. Tá byggiskráin er liðug, verður hon løgd fyri kaldbaksnevndina aftur.

**Ískoyti** :
Formaðurin setir málið á skrá.

Ráðgevin hevur gjørt vegleiðandi uppskot til bygning við hølisyvirliti, talan er um uml. 500 m2 stóran bygning við høll uml. 230 m2, umklæðingarrúmum við brúsum, serveringskøki og uppihaldsøki, goymslu v.m., sí tekning og hølisyvirlit. Ynskið er at bjóða byggiarbeiðið út í innbodnari lisitatión sum heildararbeiðstøka, krøv annars sambært útbjóðingarskrivi.

Umboð fyri staðbundnu Kaldbaksnevndina hava fingið uppskotið til bygning framlagt. Tikið varð í stórum undir við uppskotinum, men kundu yngst sær, at høllin var eitt sindur størri soleiðis, at t.d. tveir badmintonvøllir kundu verið. Støða kann takast til hetta í sambandi við útbjóðingartilgongdina.

Á íløgujátattanini 2022 eru kr. 5 mió tøkar til endamálið umframt framflutt lítil játtan frá inniverandi ári, sum lutvíst er brúkt til ymsar fyrireikingarkostnaðir. Tá tilboð fyriliggur, ber til at játta restfígging og útvega neyðugt lendi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at bjóða byggingina út í innbodnari lisitatión sum heildarbeiðstøku at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í tilgongdini um at byggja høll í Kaldbak varð mett, at høllin fór at verða uml 400 $m^2$ til støddar og neyðugt var at fáa til vega 1000 $m^2$ av lendi til byggingina.

Nú byggiskrá er skrivað, vísir tað seg, at bygningurin er uml. 500 $m^2$, við høll á uml. 230 $m^2$, umklæðingarrúmum við brúsum, serveringskøki og uppihaldsøki, goymslu v.m., tískil eru 1000 $m^2$, sum tilsøgn er fingin um frá Búnaðarstovuni, ov lítið.

Í sambandi við staðsetingina, so er hædd tikin fyri, at høllin er trekt nakað frá vegnum, og somuleiðis hevur verið hugt eftir møguleikum fyri parkering og atkomuøki framman fyri høllina.

Økið, sum tørvur er á, er nakað størri enn fyrst væntað, og tískil er neyðugt at ogna sær meirøki á 1500 $m^2$, soleiðis at samlaða økið verður tilsamans 2500 $m^2$ til bygning, parkering og atkomu. Sí viðløgdu tekning.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keyp av írestandi lendi á 1.500 $m^2$, sambært viðløgdu tekning, og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, málið fer til kunningar í kaldbaksnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 02. mars 2022:** Leiðarin á bygningsdeildini kunnaði um málið.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við festa og Búnaðarstovu um keyp av meira lendi.

Semja er nú fingin við festaran og verður bíðað eftir endaligari tilsøgn frá Búnaðarstovuni. Semjan er gjørd við støðí í undanfarnu semju við festara og Búnaðarstovuna. Áðrenn undirskriving skal henda tilsøgn fyriliggja.

Talan er um semju, ið kostar kommununi upp til 350 tkr. (sí fylgiskjal við útgreining).

Á projektkontu L57018 Fimleikahøll/borgarahús í Kaldbak eru tøkar 301.665 kr. og á løgukarminum 5575, LK57029 Fimleikahøll í Kaldbak eru tøkar 1.000 tkr.

Útboð av verkætlanini í heildararbeiðstøku verður væntandi her í mars 2022 og tí er hóskandi at fáa endaligu lendisviðurskiftini avgreidd.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at flyta 1.000 tkr. av løgukontu 5575, LK57029 Fimleikahøll í Kaldbak á projekkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak

b). at samtykkja at tilmæla fíggjarnevndini at keypa umleið 1490 m2 av jørð í Kaldbak frá Búnaðarstovuni og at lata endurgjald fyri ein samlaðan kostna á upp til 350 tkr, at fíggja av projektkontu L57029 Fimleikahøll í Kaldbak. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022**: Nevndin samtykti:
a). flyta 5.000 tkr. av løgukontu 5575, LK57018 Fimleikahøll í Kaldbak á projekkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak (fíggjarárið 2022)

b). at tilmæla fíggjarnevndini at keypa umleið 1490 m2 av jørð í Kaldbak frá Búnaðarstovuni og at lata endurgjald fyri ein samlaðan kostna á upp til 350 tkr, at fíggja av projektkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja høll í Kaldbak er boðið út í innbodnari lisitatión sambært samtykt 15. desember 2021.

Seks fyritøkur fingu í boði at lata inn tilboð viðvíkjandi bygging av høll í Kaldbak. Tær vóru:
Articon P/f
MT Højgaard P/f
J&K Petersen P/f
Búsetur Sp/f
ÁTS Sp/f
Húsavarðartænastan Sp/f

Inn komu tvey tilboð:
MT-Højgaard kann projektera og byggja høllina fyri kr. 22.057.992 u/mvg.
ÁTS kann projektera og byggja høllina fyri kr. 17.901.926 u/mvg.

Mælt verður til at taka av lægra tilboðnum og samstundis verður biðið um loyvi til at fara í sáttmálasamráðing við ÁTS.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at taka av lægra tilboðnum og at fáa heimild til at samráðast um sáttmála við ÁTS Sp/f at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 13. juni 2022:** Leiðarin á bygningsdeildini kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja høll í Kaldbak er boðið út í innbodnari licitatión sambært samtykt 15. desember 2021.

6 fyritøkur fingu í boði at lata tilboð inn viðvíkjandi bygging av høll í Kaldbak, tær vóru:
Articon P/f
MT Højgaard P/f
J&K Petersen P/f
Búsetur Sp/f
ÁTS Sp/f
Húsavarðartænastan Sp/f

Inn komu tvey tilboð:
MT-Højgaard kann projektera og byggja høllina fyri: 22.057.992 u/mvg
ÁTS kann projektera og byggja høllina fyri: 17.901.926 u/mvg

Mælt verður til at taka av lægra tilboðnum við tí broyting, at nakað av stáli er broytt til límtræ, ið hevur við sær ein lægri kostnað uppá uml. kr. 1 mió, men broytir ikki verkætlanina annars.

Skjal: Samlað kostnaðarmeting íroknað bygharraútreiðslur.

Á íløguætlanini eru kr. 5 mió settar av til byggingina á løgukontu 5775 Ítróttaanlegg, løgukonta 57018 Fimleikahøll/Borgarahús í Kaldbak. Byggingin væntast at taka uml. tvey ár. Fíggjartørvur er sostatt kr. 18 mió aftrat at býta yvir árini 2023 og 2024.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at geva umsitingini heimild til at gera arbeiðstøkusáttmála við ÁTS Sp/F um at byggja høllina í Kaldbak, og í tí sambandi at játta kr. 10 mió í íløguætlanini fyri 2023 og kr. 8 mió í íløguætlanini fyri 2024 til løgukontu 5775 ítróttaanlegg L57018 Fimleikahøll/Borgarahús í Kaldbak. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. september 2022**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg vegna Tjóðveldi, Fólkaflokkin og Framsókn um at taka undir við fíggjarnevndini við tí broyting, at peningur verður settur av til køk kr. 500.000 av íløguætlan 2023, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 203/22 Umsókn um broytan av byggisamtyktini á matr. nr. 8a og 8d, Kirkjubø í sambandi við verkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 153/22 | 22/02516-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 155/22 | 22/02516-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 174/22 | 22/02516-3 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 22.09.2022 | 5/22 | 22/02516-3 |
| 5 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 203/22 | 22/02516-3 |

**Upprunin til málið**
Kongsbóndaparið í Kirkjubø hava í eina tíð arbeitt við eini verkætlan um uppskot til ferðavinnubygning í Kirkjubø, og hava nú søkt kommununa um at tillaga byggisamtyktina í mun til hesa verkætlan.

**Lýsing av málinum**
Í eina tíð hevur verkætlanin um uppskot til ferðavinnubygning í Kirkjubø verið í umbúnað. Ætlanin er, at ferðavinnubygningurin skal kunna taka ímóti ferðafólkum (bæði útlendingum og føroyingum), ið koma til Kirkjubøar.
Nýggi bygningurin kemur at húsa, café/veitsluhølum, framsýning, stórkøki, starvsfólkarúmi, vesum, billettsølu, sølu av ferðaminnum v.m., og eisini inngongd til Fjósið.

Í stuttum kann nevnast:
Tað er umráðandi, at bygningurin leggur seg undir verandi bygningar og letur søguligu bygningarnar koma fram. T.v.s. at tá mann kemur koyrandi til staðið, skal kirkjubøgarður, múrurin, kirkjan og fjósið vera tað, sum sæst burturúr beinanvegin.

Enn er ætlanin á byrjunarstøði, men ráðgevarnir, Arkitektar99, sum arbeiða saman við bóndaparinum, hava sett verkætlanina soleiðis saman, at hesir tættar verða stýrandi fyri bygginginа:
- at seta bygningin so lágt sum gjørligt í lendið.
- Partar av bygninginum verða lagdir undir jørð.
- Ovara hæddarmark er verandi bussskýli/bygningur (sum er uml. 4 m høgt).

Sí viðheftu 22/02516-4, Ferðavinnubygningur í Kirkjubø_yvirskipað ætlan, sum sýnir greiningar av økinum, eina ávegis byggiskrá og uppskot til bygning.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum ætlanin er at byggja á, liggur partvís í J-øki og H-øki í serstøku byggisamtyktini fyri Kirkjubø og Velbastað.

Ásetingar fyri øki H: Frílendi
1. Frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.
2. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.
3. Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús, sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkinum, t.d. seyðahús, og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki.
4. Útstykking má ikki fara fram.

Ásetingar fyri øki J: Bóndahús

1. Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.
2. Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.
3. Útstykking má ikki fara fram.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Mett verður, at enn eru fleiri viðurskiftir, sum eiga at verða nágreinaði nærri.

- Tá verkætlanin av fyrstan tíð kom inn til kommununa, umrøddi kommunan ætlanina við Tjóðsavnið, grundað á at ætlanin er at byggja í einum, tí mest søguliga og fornfriðaða økinum í Føroyum. Tjóðsavnið hevði tá nakrar viðmerkingar, og upplýsir umsøkjari, at tey hava umrøtt ætlanina við Tjóðsavnið. Kommunan kundi hugsa sær at hoyrt Tjóðsavnið, soleiðis at ætlanin verður í tráð við ætlanirnar hjá Tjóðsavninum í økinum, og soleiðis at byggingin kemur at stuðla upp undir økið og ikki kemur at oyðileggja hetta serliga økið í Føroyum.
- Somuleiðis verður mett ráðiligt, at hoyra Búnaðarstovuna um ætlanirnar og harvið tryggja okkum, at eigarin av lendinum tekur undir við verkætlanini.

Kommunan hevur ikki hoyrt hesar partar enn, og verður mett neyðugt at hoyra hesar partar, áðrenn broytingin av byggisamtyktini fer til hoyringar.

Umsitingin metur somuleiðis, at rættast er at broyta ætlaða byggiøkið til eitt vinnuøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø, í staðin fyri at gera eina serstaka byggisamtykt, sum ráðgevin annars søkir um.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**

22/02516-4, Ferðavinnubygningur í Kirkjubø_yvirskipað ætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ætlaða byggiøkið verður broytt til vinnuøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø, treytað av at Búnaðarstovan og Tjóðsavnið taka undir við ætlanini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til broyting av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 8a og 8d, Kirkjubøur, hevur ligið til almenna hoyring frá 12. juli 2022 til 23. august 2022.

Í sambandi við almennu hoyringina komu 3 hoyringsskriv inn, sí skjøl *Hoyringsskriv – matr. nr. 13b, Hoyringsskriv – matr. nr. 16 og 18* og *Hoyringsskriv – Tjóðsavnið.* Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringsskrivunum umframt viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskrivini.

**Hoyringsskriv – matr. nr. 13b**
- Mæla frá at gera ídnaðarøki mitt í bygdini og beint frammanfyri matr. nr. 13b.
- Vil tryggja, at matr. nr. 13b ikki missir atkomu til húsini.
- Metir tað vera løgið, at nærmasti granni ikki verður hoyrdur.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 13b:
At orðið "ídnaðarøki" er brúkt í málslýsingini til fyrru viðgerð av málinum, er ein misskiljing. Rætta byggisamtyktarøkið í mun til ætlaða virksemið í økinum er E-øki til almennar stovnar, undirvísing, heilsurøkt, mentan og átrúnaðarlig endamál o.t. Hetta framgongur eisini av tilfarinum, ið er lagt fram í sambandi við almennu hoyringina.

Ætlaða broytingin ávirkar ikki atkomumøguleikarnar hjá matr. nr. 13b. Tá festarin er komin longur í skipanini av økinum, skal ein ætlan fyri økið góðkennast, og í viðgerðini av tí verða atlit tikin til atkomuna hjá 13b.

Øllum er tryggjað, smbr. § 6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi. Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða "hoyrdir" í tíðini, har broytingin liggur frammi alment.

**Hoyringsskriv – matr. nr. 16 og 18**
- Økið niðanfyri matr. nr. 16 og 18 eigur ikki at vera fevnt av broytingini.
- Ognirnar fara at missa alt útsýnið, umframt stóran part av ljósinum frá sjóvarmálanum.
- Ognirnar lækka í virði.
- Víst verður á, at tey framvegis eru eigarar av matr. nr. 17 niðri í Sugguni (parkeringsøkið niðri við Gamlaveg), og er hetta gomul neystagrund, sum tey hvørki hava fingið nýtslu ella endurgjald fyri, tá økið fram við Gamlavegi bleiv lagt undir parkeringsøki, uttan at eigararnir vóru kunnaðir um hetta.
- Verður nýtt øki lagt til neyst, skulu fyrilit takast til verandi eigarar av neystagrundunum, so at teir aftur kunnu brúka sínar neystagrundir.
- Ynskja fund við kommununa og byggi- og býarskipanarnevndina, so tey munnliga kunnu leggja fram áskoðan sína.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 16 og 18:
Í lýsingini av ætlanunum hjá festaranum í Kirkjubø verður dentur lagdur á, at byggingin fer at leggja seg lágt í lendið, og lýta sum minst. Parturin av ætlanini, ið er frammanfyri matr. nr. 16 og 18 er somuleiðis markeraður sum øki, ið liggur sum "møgulig" framtíðar bygging.

Viðmerking teirra um neystagrundina hevur ikki beinleiðis við hetta málið at gera, men verður send rætta viðkomandi í umsitingini.

**Hoyringsskriv – Tjóðsavnið**

- Munandi broyting, at broyta ásetingarnar frá J-øki (Bóndahús) og H-øki (frílendi) til E-øki (almennir stovnar).
- Ásetingin í E-øki um, at byggjast kann bert eftir byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki, gevur í ávísan mun møguleika fyri at ávirka, hvat og hvussu nógv verður bygt. Men tá er avgerandi, at ein tílík byggiætlan verður send til hoyringar. Og tílíkt kann best tryggjast við einari serstakari byggisamtykt.
- Ein broyting til E-øki kann lata upp fyri óhepnum avleiðingum. Í so máta er varandi áseting sum H- og J-øki meira verjandi fyri fornminnini í Kirkjubø.
- Mælt verður tí frá at broyta ásetingina til E-øki og í staðin at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, sum bæði kann rúma ávísum virksemi og tryggja atlitið til fornminnini.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá Tjóðsavninum:
Allar bygdirnar í kommununi eru fevndar av Kap. IV, § 26, stk. 5, ið sigur, at í bygdunum kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumraði, einans verða bygt sambært serstakari byggisamtykt. Hetta merkir, at byggisamtyktirnar í øllum bygdunum í kommununi eru frammanundan serstakar byggisamtyktir, og til ber ikki at gera eina serstaka byggisamtykt í eini serstakari byggisamtykt. Fyri at kunna ávirka og stýra byggingini, er í serstøku byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað áseting um, at hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki. Hetta er einasta heimild kommunan hevur fyri at stýra einari tílíkari bygging. Sum partur av víðari tilgongdini verður mælt til, at kommunan hevur almenna hoyring/viðgerð av ætlanini.

Tað er týdningarmikið, at ein ætlan hjá festaranum ikki ger seg inn á øki við fornminnum ella forkemur møguleikanum fyri at fáa eitt skipað søguligt umhvørvi, og verður ein møgulig skipan av økinum gjørd í tøttum samstarvi við Tjóðsavnið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til ikki at ganga mótmælunum á møti og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 22. september 2022:** Kunnað varð um málið. Ynskiligt at borgarnir verða hoyrdir í tilgongdini í málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 204/22 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 154/22 | 22/01377-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 50/22 | 22/01377-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 186/22 | 22/01377-1 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 157/22 | 22/01377-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 204/22 | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er  innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann lættara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | x | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.
- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Articon skal gera arbeiðsvegin hjá Innkomuvegnum, sí mál 21/02196, er møguleiki at fáa avgrivið økið til vinnustykkir, ið kommunan hevur ognað sær at útstykkja til vinnustykkir, sí mál 18/03468, við at víðka arbeiðstøkuna av arbeiðsvegnum. Av tí at økið er stórt, uml. 150.000 m$^2$, vísa ávegis metingar, at tað vil kosta áleið 23 mió. kr., og er hesin kostnaður grundaður á eindarkostnaðir hjá arbeiðstakaranum í verandi sáttmála, at gera arbeiðsvegin til Innkomuvegin.

Óvissurnar í sambandi við støðuna í heimunum gera, at mett verður, at møguleikin er stórur fyri, at kostnaðurin kann hækka munandi næstu tíðina. Tí verður somuleiðis mett, at tað er ein fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, at partar av arbeiðinum at fyrireika vinnustykkini kunnu gerast fyri áður givnar eindarkostnaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Articon at fáa grivið økið av, ið er lagt av til vinnustykkir, soleiðis at allur avgrevstur verður grivin av, og yvirskotið verður koyrt niðan til bóndan.
- at játta 23 mió. kr. av kontu 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldið Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum.
- at beina málið í býráðið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til tvær viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at heimilað verður umsitingini at gera avtalu við Articon sambært tilmælinum og við somu eindarkostnaðum sum eru nýttir í verandi sáttmála um arbeiðsvegin til innkomuvegin

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 205/22 Skeltisreglugerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 127/22 | 22/02144-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 45/22 | 22/02144-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.05.2022 | 28/22 | 22/02144-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 175/22 | 22/02144-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 58/22 | 22/02144-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 40/22 | 22/02144-1 |
| 7 Mentamálanevndin | | | 22/02144-1 |
| 8 Vinnunevndin | | | 22/02144-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 224/22 | 22/02144-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 205/22 | 22/02144-1 |

**Upprunin til málið**
Fyri vinnurekandi er skelting ein sera týdningarmikil partur av teirra virksemi. Skeltið er fyrsta ávirkanin kundin fær av virkseminum. Skeltið er andlitið úteftir og skal verða sjónligt umframt senda góð signal, soleiðis at tað dregur kundar til. Skelting er tó meiri enn andlitið úteftir hjá virkseminum. Skeltini eru eisini ein eyðsýndur partur av tí samlaðu heildarfatanini av býarmyndini. Tórshavnar kommuna, saman vit teimum vinnurekandi, hava ábyrgd av at laga skeltingina til eina størri heild, t.d. til miðbýin og bústaðarøkini í kommununi, soleiðis at vit kunnu fáa eina kommunu, har trivnaður, kunning, og tey býarskipanarligu virðini kunnu ganga hond í hond.

Fyri at náa hesum málið er ein skeltisreglugerð orðað. Umframt at stuðla marknaðarføringingini hjá vinnuni og samstundis verja heildarfatanini av býarmyndini, skal reglugerðin leiðbeina umsøkjara, umframt skipa og lætta um umsitingararbeiði í Tórshavnar kommunu sí *Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022*.

Ein slík skeltisreglugerð er ikki statisk, men kann blívur lagað til, um umstøður í kommununi ella ásetingar í byggisamtyktini verða broyttar.

**Lýsing av málinum**
Skeltisreglugerðin er býtt í fimm partar;

1. Endamál við reglugerðini
   - Í hesum partinum verður innihaldið í skeltisreglugerðini lýst, harumframt mannagongdir og leiðbeiningar.

2. Skeltishættir
   - Í hesum partinum verður skilað ímillum aktiv skeltir og passiv skeltir, ið eru ávikavist elektroniskir skermar og vanlig statisk skeltir úr ymsum tilfari.

3. Endamál við skeltinum
   - Í hesum partinum, verða tey trý skeltissløgini, sum Tórshavnar kommuna loyvir, lýst. Hetta eru; Virkis- og tænastuskeltir, kunningarskeltir og lýsingarskeltir.

4. Meginreglur fyri snið, uppsetan og staðseting
   - Í hesum partinum verða yvirskipaðir tættir innan snið, uppsetan og staðseting av skeltinum lýst umframt ymiskir hættir at skelta uppá, so sum húsaveggskelti, hangandi skelti, tilklistrað vindeygu,

vanlig og størri leys skelti, navnaskelti á bústaðarøki, tíðaravmarkað skelting, talgildir skermar og kunningarskelti.

5. Óbygt øki – 4. Grundumráði
   - Í hesum partinum verður undirstrikað, at skelting í 4. Grundumráði vanliga ikki er loyvd.

Fyri at gera reglugerðina bindandi og fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna handhevja innihaldið eru ásetingarnar um skelting rótfestar í almennu byggisamtyktini, ið síðani vísir til sjálva skeltisreglugerðina.

Eitt kort verður knýtt til reglugerðina, soleiðis at umsøkjarin á ein smidligan hátt lætt kann síggja hvørjar ásetingar eru á teimum einstøku økjunum í kommununi sí *Kort við økisásetingum*

Skeltisreglugerðin er galdandi frá tí hon verður samtykt og fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02144-2 Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022
22/02144-3 Kort við økisásetingum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til skeltisreglugerðina og beinir málið víðari í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina, mentamálanevndina, vinnunevndina, fíggjarnevndina og býráðið til umrøðu og støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Útsett.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sambært *løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir* er einasta bindandi amboðið, kommunur hava, tá tað snýr seg um bygging, herundir eisini skelting, byggisamtyktir.

Fyri at gera skeltisreglugerðina bindandi fyri borgaran er tí neyðugt at knýta hana at byggisamtyktini.

Umráðispartarnir í tí almennu byggisamtyktini eru økir, ið eru ætlað ávísum virksemi, og hava byggireglulerandi ásetingar hesum viðvíkjandi. Almenna byggisamtyktin er býtt upp í 26 ymiskar umráðispartar við ymsum nágreinaðum ásetingum.

Líkasum við ásetingunum um umhvørvisflokking verða ásetingarnar um skelting fyri viðkomandi umráðispartar í byggisamtyktini. Víst verður síðani til skeltisreglugerðina, ið m.a. nágreinar støddir, staðseting og snið av skeltum.

Á henda hátta fáa vit eina bindandi skeltisreglugerð, sum kommunan hevur heimild til at brúka sum eitt virki amboð í mun til skelting í kommununi.

Sí punkt, ið verða sett inn undir hvønn umráðispart í almennu byggisamtyktini niðanfyri:

**§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 3. Ásetingar fyri 2. grundumráði.**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 6. Ásetingar fyri umráðispartarnar A2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 7. Ásetingar fyri A3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 8. ásetingar fyri umráðispart B1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 9. Ásetingar fyri umráðispart B2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 11. Ásetingar fyri umráðispart B4 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 12. Ásetingar fyri umráðispart B5 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 13. Ásetingar fyri umráðispart B6 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 14. Ásetingar fyri umráðispart B7 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 16. Ásetingar fyri umráðispart B9 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 17. Ásetingar fyri umráðispartarnar B10 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar B11 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 19. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 20. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1A í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 21. Ásetingar fyri umráðispart C2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 23. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í umráðispartið D1 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | |

Loyvd skelting í umráðispartið D2 er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

Loyvd skelting í umráðisparti D3 er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartar E í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 25. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. Grundumráði** Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 26. Ásetingar fyri 4. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í 4 grundumráði sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | (x) |

Tilgondin tá broytingar verða framdar í almennu byggisamtyktini er henda:
Tá allar nevndir og býráðið hava samtykt skeltisreglugerðina, verður uppskotið um ásetingarnar um skelting í byggisamtyktini lagt til almenna hoyring í 6 vikur. Um ongar viðmerkingar eru frá almenninginum, verður uppskotið til broyting av byggisamtyktini sent til góðkenningar hjá landsmyndugleikanum. Um landsmyndugleikin goðkennir uppskotið, verður skeltisreglugerðin eitt bindandi skjal, heimilað í byggisamtyktini.

Um viðmerkingar eru, skal umsitingin viðgera hesar og leggja málið aftur til politiska støðutakan.

**Tilmæli**
Víst verður til tilmælið frá 30.05.2022.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið av skrá.

## 206/22 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið har nýggja bakaríið skal byggjast matr. nr. 322 og 323, Tórsgøta/Sverrisgøta, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 147/22 | 21/00642-6 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 163/22 | 21/00642-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 172/22 | 21/00642-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 206/22 | 21/00642-6 |

**Upprunin til málið**
Ymiskir íleggjarar/byggiharrar hava í eina tíð víst áhugað í at byggja íbúðir á matr. nr. 32, har gamla bakaríið hjá Franst Restorff var. Nú eitt felag hevur keypt ognirnar (ella gjørt avtalu um at keypa ognirnar) á matr. nr. 322, 321, 369 og 370, sí skjal *Broyting av byggisamtykt*, er klárt hjá umsitingini at viðgera umsóknina um at gera serstaka byggisamtykt fyri ognirnar.

Nýggi eigarin ynskir somuleiðis, at serstaka byggisamtyktin skal fevna um matr. nr. 323 og 368, ið eru privat ogn hjá øðrum eigara, umframt matr. nr. 365, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Í smb. við at formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hevur havt eitt ynski um at endurskoða ásetingarnar fyri miðbýin, hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu greinað miðbýarkjarnina, og er komin við nøkrum átøkum ið kundu verði gjørd, soleiðis at tey serligu eyðkennini í miðbýnum verða varðveitt, samstundis sum man byggir meir, og fær fleiri bústaðir í miðbýnum. Í greiningini hjá umsitingini verður m.a. víst á nakrar kvalitetir í miðbýnum, ið man ynskir verða varðveitir, og hvussu man kann byggja hægri í útvaldum økjum. Tá bygt verður hægri hevur tað týdning, at ovasta hædd verður trekt inn, hetta soleiðis at bygningurin ikki sýnist so høgur og ger betur ljósviðurskifti niðri á vegnum. Harumframt eigur niðasta hædd at verður trekt inn, soleiðis at vegur og fortov verður rúmligari, og tað ber til at hava forpláss til bygningarnir, ið hava útvent virksemi á niðastu hædd, og at atlit verður tikið til veðurviðurskiftini vit hava í Føroyum.

Tríggir ráðgevar eru bidnir um at koma við tilboði uppá at gera eina ætlan fyri miðbýarkjarnuna, ið nágreinar hesi átøk, og sum kann vera grundarlag fyri eini nýggjari serstakari byggisamtykt fyri økið. Tilboðini frá ráðgevunum verða eftir ætlan inni 1. juli, soleiðis at arbeiðið at gera ætlanina kann byrja 1. september og handast kommununi 1. desember 2022.

Av tí at ætlanirnar við gamla bakarínum hjá Frants Restorff eru komnar nakað ávegis, er ætlanin í fyrstu atløgu at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 321, 322, 323, 365, 368, 369 og 370. Ætlanin er at víðka hesa serstøku byggisamtyktina seinni, í tráð við ætlanina fyri miðbýarkjarnuna, sum vinnandi ráðgevarnir eftir ætlan handa kommununi 1. desember 2022.

Verkætlanin sum P/F Frants Restorff hevur í umbúnaði, umfatar 35+12 leiguíbúðir í ymiskum støddum, samantvinnað við 700 m$^2$ av handilshølum og parkering undir jørð. Leiguíbúðir í ymiskum støddum – frá 2-3 rúmum er við til at tryggja ymiskleika og sentrala staðseting av bústøðum. Handilshølini á niðastu hædd eru við transparentum framsíðum, sum verður partur av miðbýarvirkseminum, og 1 parkeringspláss til hvørja íbúð er staðsett undir jørð, soleiðis at parkeringstørvurin hjá íbúgvunum verður nøktaður á ognini sjálvari, uttan at parkeringin gerst ein sjónligur partur av býarmyndini.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina loyvir bygging smb. innsendu umsókn, sí skjal *Miðbýarbygging,* vit tí broyting, at niðasta hædd móti Sverrisgøtu og Tórsgøtu verður trekt inn, soleiðis at eitt yvirdekkað øki verður á miðhædd, við møguleika fyri upphald, og lívd fyri veðrinum.

Eigararnir byggja íbúðirnar og síðani er ætlanin at selja til annað felag, ið skal leiga út og umsita. Ásetingar um nýtslu verða settar í serstøku byggisamtyktina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 1. grundumráði eru m.a.:

- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,3
- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.
- Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at hetta er ein stór broyting fyri miðbýin er tað týdningarmikið, at hendan ætlanin tekur atlit til ætlanirnar fyri miðbýin, sum umsitingin arbeiðir við síðuleypandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu,* journal nr. 22/02494

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Broyting av byggisamtykt,* journal nr. 21/00642-10.
- *Miðbýarbygging,* journal nr. 21/00642-12.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna smb. umsóknini *Miðbýarbygging*, við tillagingunum sum nevndar eru omanfyri og treytað av at avtala fæst við aðrar eigarar av ognum, ið eru fevndar av uppskotinum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tróndur Sigurðsson setti fram broytingaruppskot um, at matr. nr. 327, Tórshavn, eisini verður fevnt av ætlaðu broytingini í byggisamtyktini.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskiparnevndini við broytingaruppskotinum frá Tróndi Sigurðsson, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Uppskotið til nýggju serstøku byggisamtyktina fyri miðbýarkjarnuna hevur ligið til almenna hoyring frá 11. juli 2022 til 22. august 2022.

Í smb. við almennu hoyringina komu 5 hoyringsskriv inn, sí skjøl *Hoyringssvar – matr. nr. 316, Hoyringsskriv – matr. nr. 318, Hoyringsskriv – matr. r. 323, Hoyringsskriv – matr. nr. 368* og *Hoyringsskriv – Grannalív.* Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringsskrivunum umframt viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskrivini.

**Hoyringsskriv – matr. nr. 316 og 318**

- Ynskja at fáa somu møguleikar at byggja sum grannarnir, t.v.s. byggistig upp til 0,9 og nýtslustig upp til 3,6, umframt 11 metrar høgt og 3,5 metrar hægri 3 metrar frá matrikulmarki.
- Víst verður á, at við ætlaðu bygginini missa tey ljós í eystursíðuni/landnyrðing-eystan, og tí ynskja tey at sleppa at byggja hægri, soleiðis at tey eisini hava møguleika fyri at fáa eitt sindur av ljósi á ognina.
- Meta seg vera náttúrligur partur av "miðbýarkjarnanum".
- Víst verður á, at tey áður hava søkt um frávik frá almennu byggisamtyktini, men fingu noktandi svar (mál 2007-3273). Í grundgevingini stóð m.a., at man tilvitað einans hevur broytt ásetingarnar fyri ognirnar, ið liggja upp at Dr. Jacobsensgøtu/Sverrisgøtu, tí man metti, at umhvørvið í fleiri av síðugøtunum var vert at varðveita, t.d. Tróndargøtu og Bøgøtu, har fleiri upprunalig smærri sethús standa. Hetta er síðani staðfest í býaratlasinum. Tað er eyðsýnt, at kommunan nú hevur tikið støðu til ikki at varðveita Magnus Heinasonargøtu í "uppruna"dámi.
- Húsini á matr. nr. 316 eru ikki varðveitingarverd, av tí at tað fleiri ferðir er bygt um. Tað sama ger seg galdandi fyri ovara part av Magnus Heinasonargøtu.
- Taka undir við serstøku byggisamtyktini við teirri treyt, at hon eisini kemur at fevna um teirra matrikkul.
- Tá umfatandi byggingin fer í gongd, vilja tey verða kunnað um tilgongdina – hvussu leingi hon fer at vara, møguligir ampar, gang osfr. Somuleiðis rokna tey við, at kommunan kemur við ásetingum um, hvørjar dagar og nær á degnum arbeitt verður v.m.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 316 og 318:
Í fyrsta umfari eru matr. nr. 316 og 318 ikki partur av økinum, sum er definerað sum "miðbýarkjarnan". Ætlanin er tó at víðka um/gera líknandi ætlanir fyri onnur øki í miðbýnum, so tað er ikki óhugsandi, at ásetinarnar fyri matr. nr. 316 og 318 verða broyttar innan eina ávísa tíð.

Ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, sum í dag eru galdandi fyri økið (1. Grundumráði), loyvir bygging, ið er 13 m úti í mark. Hetta er bæði galdandi fyri ognirnar, ið uppskotið til serstøku byggisamtyktina fevnir um, umframt matr. nr. 316 og 318.

Nýggja uppskotið til serstaka byggisamtykt ásetir, at bygging út í mark móti Magnus Heinasonar gøtu ikki skal vera hægri enn 11 m. Afturat hesum ber til at byggja eina hædd, ið ikki er hægri enn 3,5 m, og sum er min. 3 m frá matrikulmarki. Úti í mark er hæddin sambært nýggja uppskotinum til serstaka byggisamtykt

altso lægri enn ásetingarnar í galdandi ásetingum fyri økið, og 3 m frá marki kann byggingin vera 14,5 m høg (1,5 m hægri enn loyvt smb. galdandi ásetingum). Hetta verður mett at vera nøktandi fyri at tryggja, at ljósviðurskiftini fyri umkringliggjandi ognir ikki gerast verri, enn smb. galdandi ásetingum.

Tílíkar byggiverkætlanir, sum tann ið er ætlað, hava eina ávirkan á sítt nærumhvørvið, í tíðini byggingin stendur á. Hetta er ein neyðug avleiðing, um man ynskir at tætta býin, og um møguleikar skulu vera at byggja í tætta umhvørvinum. Hetta skal tó gerast í samráð við viðkomandi myndugleikar og innan eina ávísa rímiligiheitsgrensu. Hetta verður viðgjørt og lýst nærri, tá verkætlanin er komin longur.

**Hoyringsskriv – matr. nr. 368**

- Ikki fult innlit í, hvørja ávirkan ætlanin hevur á umhvørvið.
- Ognin á matr. nr. 368 kann í mesta lagi verða í tveimum hæddum. Bygningarnir hinumegin vegin kunnu smb. serstøku byggisamtyktini verða upp til 5 hæddir við kjallarahædd móti matr. nr. 368 og koma at standa sum eitt stórt forberg móti ognini.
- Kenna heldur ikki ávirkanina á vegakervið, sum ikki sær út til at vera kannað. Nógvar nýggjar íbúðir økir ferðsluna munandi og kann hava skaðiliga ávirkan á virksemið í grannalagnum, vantandi parkeringspláss til kundar v.m.
- Umfatandi umbygging, sum kann taka fleiri ár, har alt kringøkið liggur sum byggiøki við ferðsluforðingum v.m. Eisini hetta hevur skaðiliga ávirkan á handilsvirksemið í byggitíðini.
- Matr. nr. 368 er nevnt í smb. við, at serstaka byggisamtyktin skal verða partur av eini størri heildarætlan fyri miðbýarkjarnina. Eigarin av matr. nr. 368 veit ikki ítøkiligt, um møguligar ætlanir, sum kommunan hevur við ognini. Neyðugt er við betri kunning um ætlanirnar við matr. nr. 368. Væntar fundarinnkalling hesum viðvíkjandi.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 368:
Ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, sum í dag eru galdandi fyri økið (1. Grundumráði), loyvir bygging, ið er 13 m úti í mark. Hetta er bæði galdandi fyri ognirnar, ið uppskotið til serstøku byggisamtyktina fevnir um, umframt matr. 368. Út móti Tórsgøtu loyvir nýggja uppskotið til serstaka byggisamtykt bygging, ið er 13 m høg, umframt einari hædd, ið er í mesta lagi 3,5 m høg og trekt 3 m frá matrikulmarki. Hetta verður mett at vera nøktandi fyri at tryggja, at ljósviðurskiftini fyri umkringliggjandi ognir ikki gerast verri, enn smb. galdandi ásetingum.

Ferðsluteljingar vísa, at tað koyra uml. 3400 bilar eftir Tórsgøtu um samdøgrið. Verkætlanin á matr. nr. 322 og 321 er lýst at hava 35 íbúðir. Hetta, saman við ætlaðu handilshølunum á veghædd og møguligari meirbygging á matr. nr. 327 og 323 verður ikki mett at hava munandi ávirkan á ferðsluviðurskiftini í økinum.

Krøv viðv. parkering verða tey somu fyri byggisamtyktarøkið, sum fyri økið annars, og fer hetta so statt heldur ikki at hava munandi ávirkan á parkeringsviðurskiftini í økinum.

Tílíkar byggiverkætlanir, sum tann ið er ætlað, hava eina ávirkan á sítt nærumhvørvið, í tíðini byggingin stendur á. Hetta er ein neyðug avleiðing, um man ynskir at tætta býin, og um møguleikar skulu vera at byggja í tætta umhvørvinum. Hetta skal tó gerast í samráð við viðkomandi myndugleikar og innan eina ávísa rímiligiheitsgrensu.

Ráðgevar eru farnir í holt við eina ætlan fyri miðbýarkjarnuna, ið skal vera grundarlag fyri at víðka um hesa serstøku byggisamtyktina. Matr. nr. 368 er partur av økinum, definerað sum "miðbýarkjarnan", og fer eisini matrikkulin so statt væntandi at fáa nýggjar ásetingar í nærmastu framtíð, við støði í ætlanini fyri miðbýarkjarnuna. Fundur er avtalaður við eigarar av matr. nr. 368, har hetta og onnur viðurskifti verða umrødd.

**Hoyringsskriv – matr. nr. 323**

- Ognin liggur í økinum, sum er fevnt av uppskotinum til serstøku byggisamtyktina.

- Vónandi fer broytingin at føra við sær øktan trivnað fyri øll, ið eru góð við miðbýin, og tey, ið longu búgva har. Eisini meðan bygt verður.
- Undrast á, hvat § 5 merkir: "Stk. 1. Tilfarsvalið skal vera býarkent." og "Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging." Hvat merkir henda paragraffin fyri byrjaðar umbyggingar av húsunum á matr. nr. 323?
- Ynski er, at matr. nr. 323 fær sama rætt til plássið undir veghæddini við Magnus Heinasonar gøtu til at verða útnyttað til fulnar eftir sama leisti sum hjá grannanum.
- Áttu at innført bústaðarskyldu ella, at kommunan á annan hátt tryggjar, at íbúðirnar ikki standa tómar. Best um fólk umboðandi borgararnar í kommununi hava møguleika at seta búgv í økinum.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 323:
§ 5 stk. 1 er ein "bleyt" orðing, ið er ætlað at vísa, at man ynskir, at tilfarsvalið er gjørt grundað á eitt tilvitað arkitektoniskt val, og at hugsað verður um tað umhvørvið, bygt verður í. Givin byggiloyvi verða ikki tikin aftur, men í framtíðarbygging verður tað í byggimálsviðgerðini viðgjørt, um tilfarsvalið kann góðkennast.

Matr. nr. 323 hevur somu møguleikar fyri at byggja undir jørð, sum restin av byggisamtyktarøkinum.

**Hoyringsskriv – Felagið "Grannalív" umboðandi íbúgvar við Tinghúsvegin niðara part, Kongagøtu, Tungugøtu og Lucas Debesar gøtu**

- Heita á býráðið um at steðga á og í staðin fyri at tillaga byggisamtyktirnar eftir ynski frá einstøkum byggiharrum, so eigur kommunan at gera eina nýggja heildarætlan fyri miðbýin, fyri at sikra sær, at kommunan ikki ger eina "Karlamagnusarbreyt" afturat niðri í býnum.
- Vísa til sendirøð á DR, ið kallast "Er der en arkitekt til stede", har verturin vitjar støð, har kommunurnar hava verið nakað lagaligar í sambandi við broytingar av byggisamtyktum.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskrivið frá "Grannalív":
Hetta uppskotið til serstaka byggisamtykt er liður í arbeiðinum at gera eina nýggja ætlan fyri miðbýarkjarnuna. Ætlanin verður gjørd av ráðgevum, ið fara at greina og lýsa tørv og møguleikar í miðbýarkjarnuni.

Í sambandi við við at umsitingin hevur umrøtt serstøku byggisamtyktina aftur í mun til innkomnar viðmerkingar, so eru ymsar tillagingar gjørdar í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at ásetingarnar gerast greiðari og neyvari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna 01.09.22,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Elsa Berg legði vegna Tjóðveldi, Fólkaflokkin og Framsókn fram soljóðandi broytingaruppskot: Minnilutin skjýtur upp at hava ein borgarafund um málið og at bíða eftir heildarætlanini um miðbýarkjarnina, áðrenn tað verður samtykt.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við 6 atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Gunvør Balle og Ruth Vang.

## 207/22 Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 148/22 | 22/02494-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 160/22 | 22/02494-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 173/22 | 22/02494-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 207/22 | 22/02494-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu viðger í løtuni nakrar umsóknir um bygging inni í miðbýnum (1. og 2. Grundumráði), sum ikki eru í tráð við almennu byggisamtyktina fyri økið, men sum annars politiskt og býarskipanarliga verða mettar sum ætlanir, ið gagna býnum og eru í tráð við ymiskar ætlanir fyri býin, t.d. Miðbýarætlanina. Tá bygging ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina, men man annars tekur undir við ætlanini, eru møguleikin fyri at gera serstakar byggisamtyktir mest nýtta býarskipanarliga amboðið. Tað er júst hetta amboðið, ið hevði verið nýtt í teimum umsóknunum, ið eru inni, men ein áseting í almennu byggisamtyktini um mest loyvda nýtslustig fyri økið sum heild forðar hesum.

**Lýsing av málinum**
Í øllum byggiøkjum í kommununi eru ásetingar um bygging so sum byggistig, nýtslustig og hæddir ásettar í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis stendur lýst, hvørjum ásetingum víkjast kann frá, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Hetta er eitt nógv nýtt amboð í fleiri ymiskum byggiøkjum, og verður nýtt til at skipa tað avmarkaða økið nærri í mun til nærumhvørvið, politikkir og ætlanir í kommununi og tílíkt. Fyri 1. og 2. Grundumráði er ásett, at víkjast kann frá ásetingunum um byggistig, nýtslustig og hæddir, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Tá kemur til byggistig og hæddir, so er einki hægsta mark fyri, hvussu stórt frávikið kann vera, men tá tað kemur til nýtslustig er ásett, at frávikið í mesta lagi má vera 3,0 fyri økið sum heild í 1. grundumráði og 1,25 fyri økið sum heild í 2. grundumráði. At áseta eitt mark fyri, hvussu høgt nýtslustigið fyri eitt økið sum heild, verður mett at vera ein ótíðarhóskandi og órímiligur máti at skipa øki í byggisamtyktini, av tí at talan er um ymiskir eigarar í sama øki, ið ikki fáa somu treytir at byggja undir.

Mett verður, at ásetingin um, at nýtslustigið ikki skal fara upp um eitt vist (3,0 í 1. grundumráði og 1,25 í 2. grundumráði) fyri økið sum heild, eigur at verða tikið úr almennu byggisamtyktini.

Nýtslustigið regulerar fyrst og fremst tættleikan í einum øki. Tættleikin hevur ávirkan á, hvussu nógv øki er eftir til fríøki, samlaða vavið av byggingini í økinum og hvussu nógv trýst er á ymisku teknisku leiðingunum í økinum.

Tað kunnu vera fleiri orsøkir til, at hægri nýtslustig er neyðugt fyri víðari menningina av miðbýnum. T.d. fleiri eldri økjum í miðbýnum, har flestu bygningarnir vóru bygdir, áðrenn almenna byggisamtyktin varð gjørd, og tí eru flestu bygningarnir størri í vavi enn ásetingar fyri 2. grundumráði loyva. Tá kann tað vera hóskandi at loyv tættari bygging, enn almenna byggisamtyktin loyvir, soleiðis at nýggja byggingin í vavi hóskar til byggingina í nærumhvørvinum.

Tað kann eisini vera, at mett verður, at ávíst virksemi tolir størri tættleika, enn ásetingar í almennu byggisamtyktini loyva. Tað kann t.d. virskemi, ið ikki hevur eins stóran tørv á fríøkjum og ikki lastar teknisku leiðingarnar í økinum eins nógv, og økið annars er ætlað til.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sí viðhefta skjal *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði*, journal nr. 22/02494-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingin um nýtslustig sum heild, § 2, stk. 7 og § 3, stk. 7, smb. skjali *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði*, verður tikið úr almennu byggisamtyktini og beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til broyting av ásetingum fyri nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini hevur ligið til almenna hoyring frá 7. juli 2022 til 25. august 2022.

Í smb. við almennu hoyringina komu 2 hoyringsskriv inn, sí skjøl *Hoyringsskriv – 409d* og *Hoyringssriv – 647l.* Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringsskrivunum, umframt viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskrivini.

Hoyringsskriv – matr. nr. 409d

- Mótmæla uppskotinum um nýggja serstaka byggisamtykt fyri parkeringshúsi við Bøkjarabrekku, umframt broytingini av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini. Orsøkin til, at mótmælið fevnir um bæði uppskotini er, at broytingin av almennu byggisamtyktini er ein fortreyt fyri at tað, møguliga, verður heimild fyri serstøku byggisamtyktini.
- Uppskotið at strika ásetingina um, at nýtslustigið fyri økið sum heild ikki má fara upp um 3,0, er undir alt lágmark fyri, hvat lokalplanleggjandi myndugleikin kann loyva sær yvir fyri sínum borgarum.
- Um kommunan avtekur hægsta markið, so stendur einans orðingin *fyri hóskiligt, natúrliga avmarkað øki* eftir. Hendan orðingin er ein bleyt orðing, og kommunan sýnist at tulka hesa orðing ymiskt, alt eftir hvussu vindurin blæsur.

- Um lokalplanleggjandi myndugleikin nú broytir evsta mark fyri nýtslustigi og síðani við serstakari byggisamtykt loyvir verkætlanini, soleiðis sum hon nú er lýst, so kann borgarin ongantíð vita, hvat kommunan ætlar sær við einum øki, og tá hevur almenn byggisamtykt fyri eitt øki lítið at siga.
- Um kommunan bara soleiðis kann broyta eina almenna byggisamtykt fyri at loyva einari ítøkiligari verkætlan, hvar eru vit tá komin í planleggjandi høpi?
- Bæði kommunan og borgarin hava tørv á at hava eitt evsta mark fyri, hvussu nógv víkjast kann frá vanligu krøvunum og reglunum.
- Kommunan hevur tørv á hesum, tí annars er vandi fyri, at hon verður trýst av kapitalistum og fólkum, sum bara hava egna vinning fyri eyga og ikki tað, sum er gagnligt fyri almenna borgaran.
- Fyri borgaran hevur hetta týdning, tí at hann við einum evsta marki veit, hvat í ringasta føri kann væntast.
- Við at strika hetta markið skal kommunan í hvørjum einstøkum føri meta um, nær talan er um eitt hóskiligt, natúrliga avmarkað øki, og tá er stórur vandi fyri tilvildarligari viðgerð og ivasomum avgerðum við ongum ella skeivum grundgevingum.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 409d:
Broytingin av ásetingum fyri nýtslustig í almennu byggisamtyktini er nakað, umsitingin hevur tosað um í eina tíð, og er ikki einans ætlað fyri at geva heimild fyri at gera serstøku byggisamtyktina fyri parkeringshúsið við Bøkjarabrekku.

Í serstøkum byggisamtyktum í 1. og 2. grundumráði ber til at víkja frá ásetingum um t.d. hædd, byggistig, og nýtslustig. Fyri hædd og byggistig er einki hámark, men fyri nýtslustigið hevur eitt hámark verið, og hevur hetta verið avmarkandi fyri menningina av ymsum økjum, t.d. ymisk eldri øki í miðbýnum. Um hægri nýtslustig, byggistig ella hædd skal loyvast í einum øki, krevur hetta tó altíð eina ítøkiliga viðgerð í mun til m.a. økið sum heild, ætlanir og politikkir í kommununi, umframt at allar vanligar mannagongdir, so sum almenn framløga, hoyring hjá viðkomandi myndugleikum og góðkenning av landsstýrinum, skulu fylgjast. Við at broyta ásetingarnar viðv. nýtslustignum í serstøkum byggisamtyktum fer viðgerðin av hesum at vera undir somu treytum, sum viðgerðin av, um hægri byggistig ella hædd skal loyvast, er.

Viðgerðin av, um ein serstøk byggisamtykt skal loyvast ella ikki, er altíð ein ítøkilig viðgerð, ið krevur, at umsitingin fyriheldur seg kritiskt yvirfyri teimum ymisku viðurskiftunum, sum eru viðkomandi fyri ognina. Hóast tað í ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri økið stendur, at til ber at gera serstaka byggisamtykt fyri økið, so er tilmælið frá umsitingini altíð grundað á tey ítøkiligu viðurskiftini í økinum – um tað so er noktandi ella játtandi.

Hoyringsskriv – matr. nr. 647l
- Broytingin gevur møguleika fyri, at høg bygging, ið tekur sólargang og útsýni, verður bygd frammanfyri ognina. Um tílík bygging er ætlað frammanfyri ogn teirra, ynskja eigararnir at mótmæla í góðari tíð.

Viðmerkingar frá umsitingini til hoyringsskriv frá matr. nr. 647l:
Ongar ítøkiligar ætlanir eru um bygging frammanfyri matr. nr. 646l. Hóast eigarar av eini ávísari ogn ynskja at gagnnýta teir møguleikarnar fyri bygging, ið hetta uppskotið til broyting av byggisamtyktini geva, so er neyðugt við eini serstakari byggisamtykt fyri byggingina, ið skal fylgja øllum vanligum mannagongdum, so sum politisk viðgerð, almenn hoyring, og góðkenning av landsstýrinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til ikki at ganga hoyringsskrivunum á møti, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 208/22 Eykajáttan til nýggja maskinu til vegamerking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2022 | 57/22 | 22/04630-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 226/22 | 22/04630-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 208/22 | 22/04630-1 |

**Upprunin til málið**
Ferðsluliðið undir rakstrarstovninum hevur ábyrgdina av, at vegirnir í Tórshavnar kommunu verða merktir, tá merkingin er slitin, ella tá vegastrekkir eru umvæld ella asfalterað.

Hetta krevur, at útbúnaður er tøkur og virkandi, tá veður og arbeiðsumstøður annars loyva, at arbeiðið verður framt.

Tørvur er á at fáa til vega eina nýggja maskinu til vegamerking til arbeiðið í 2023 og frameftir fyri at tryggja, at henda funktiónin í virkseminum hjá rakstrarstovninum kann verða framd á ein støðugan og optimalan hátt.

**Lýsing av málinum**
Arbeiðið at merkja vegirnar er sera nógv tengt at veðrinum. Tað skal vera tátt, tá vegirnir verða merktir. Eisini er best, um hetta arbeiðið verður framt, tá ferðslan er minst, og verður tí oftast arbeitt um náttina.

Tí er summarið háárstíð fyri merking av vegunum. Tá eru vegirnir oftast táir, og næturnar eru ljósar.

Tað eru í høvuðsheitum tveir ymiskir hættir at merkja vegirnar: vanlig vegamáling og termoplast. Tórshavnar kommuna hevur útgerð til báðar hættir. Vanliga vegamálingin er ikki eins slitsterk og termoplast, men bíligari í tilfari. Hon verður ofta brúkt til parkeringsbásar og annars á økjum, har slitið ikki er stórt. Termoplast er dýrari í tilfari, men heldur nógv betri enn vanlig vegamáling, harafturat hevur termoplastið eisini eitt relief í mun til farbreytina, og tí kann henda merkingin eisini merkjast, tá koyrt verður yvir hana. Hetta hevur týdning, tá talan er um miðstrípur, hávatenn, gonguteigar o.l.

Í 2022 hevur veðrið verið svikaligt, og tí hava umstøðurnar ikki verið optimalar fyri merking av vegunum. Harafturat hevur maskinan til merking við termoplasti verið í ólagi. Tað hevur ikki verið gjørligt hjá verkstaðnum, at umvæla maskinuna, tí er hon blivin send til Danmarkar til umvælingar. Hetta hevur viðført, at ferðsluliðið ikki hevur verið ført fyri at merkja teir vegir, sum ætlanin var at merkja, og tí er merkingin av vegunum við termoplasti komin langt afturút í mun til ætlan og eisini í mun til umvælingar og asfalteringsarbeiðir, sum annars eru gjørd. Hetta hevur neiliga ávirkan á trygdina á hesum vegum.

Tað hevur ikki verið møguligt, at leiga tilsvarandi maskinu í umvælingartíðini.

Mett verður, at um ferðsluliðið hevur tvær maskinur til vegamerking við termoplasti, so kann tryggjast, at tað altíð er ein maskina tøk, um umvælingar eru neyðugar á hini maskinuni.

Leiðarin av verkstaðnum upplýsir, at ein nýggj maskina til vegamerking við termoplasti kostar uml. kr. 1.600.000,-. Tá er íroknað frakt, mvg og allar útreiðslur í sambandi við upplæring av førarum í at brúka maskinuna rætt. Tað er long veitingartíð til slíkar sermaskinur, og tí er neyðugt, at maskinan verður bíløgd frá veitara í heyst (2022), fyri at hon skal verða tøk á vári 2023.

Talan er um eina Borum Master2700 maskina til vegamerking við standard útgerð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| 1.600.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.600.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at umrøða møguliga játtan, kr. 1.600.000, av eykajáttan á konto 8375, Rakstrargøgn (íløgur), til innkeyp av nýggjari maskinu til vegamerking og beina málið víðari umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og fíggja av kontu LK71007 Brennistøðin, skiljuhøll.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 209/22 Avtalu millum Kommunalu Brennistøðina á Hjalla (KB) og Fjarhitafelagið (FHF)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 225/22 | 22/02807-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 209/22 | 22/02807-2 |

**Upprunin til málið**
Í 1999 varð samstarvsavtala gjørd millum Kommunalu Brennistøðina (KB) og P/F Fjarhitafelagið (FHF), har avlopshiti frá KB verður latin FHF.

**Lýsing av málinum**
Fyri at fáa staðfest at fjarhitin er ein grøn orkukelda, er neyðugt at fáa nágreinað avtaluna millum KB og FHF - soleiðis at orkan, sum kemur fáa KB til FHF, verður at meta sum avlopsorka.

Fyrisitingin mælir til at ískoyti verður lagt aftrat verðandi sáttmálað sum er orðað í skjalið nr 22/02807-4 - Nágreining av avtalu millum KB og FHF – undirskriva.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
**Skjøl**
22/02807-3 - Nágreining av avtalu millum KB og FHF - undirskrivað
22/02807-3 - Forsíða - Samstarvsavtala millum KB og FHF
22/02807-4 - Samstarvsavtala millum KB og FHF - j.nr. 19991546
22/02807-5 - CO2 emission factor for waste incineration

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til at samtykt verður at leggja ískoyti aftrat verðandi sáttmálað sum er orðað í skjalið nr 22/02807-4

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 210/22 Bátahylur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 3/19 | 19/00083-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 4/19 | 19/00083-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 6/19 | 19/00083-1 |
| 4 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 36/19 | 19/00083-1 |
| 5 Vinnunevndin | 27.06.2019 | 40/19 | 19/00083-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 217/19 | 19/00083-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 187/19 | 19/00083-1 |
| 8 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 5/20 | 19/00083-1 |
| 9 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 13/20 | 19/00083-1 |
| 10 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 20/20 | 19/00083-1 |
| 11 Vinnunevndin | 11.05.2020 | 44/20 | 19/00083-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 111/20 | 19/00083-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 88/20 | 19/00083-1 |
| 14 Havnanevndin | 09.03.2021 | 11/21 | 19/00083-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 39/21 | 19/00083-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 77/21 | 19/00083-1 |
| 17 Havnanevndin | 11.05.2021 | 22/21 | 19/00083-1 |
| 18 Havnanevndin | 16.09.2021 | 30/21 | 19/00083-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 228/21 | 19/00083-1 |
| 20 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 208/21 | 19/00083-1 |
| 21 Havnanevndin | 26.09.2022 | 22/22 | 19/00083-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 229/22 | 19/00083-1 |
| 23 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 210/22 | 19/00083-1 |

**Upprunin til málið: Upprunin til málið:**
Býráðið hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió kr til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri.
Tað hevur verið tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn í nógv ár. Við ársenda 2018 vóru tað 200, sum stóðu á bíðilista til bátapláss, og sum øll hava goldið kr. 2.000 í depositum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavn og á Argjum eru tilsamans 550 bátapláss. Tað hava ymiskar ætlanir verið frammi um at gera bátahavn, men ongin hevur borið á mál.
Síðani simuleringar vóru gjørdar av bátahyli í Álakeri í 2006, er havnarlagið nógv útbygt, og tann nýggi molin kemur nógv longur vestur. Simuleringar vísa, at havnaútbyggingin betrar um kyrruna í Álakeri.
Nýggj simulering eigur at verða gjørd, áðrenn farið verður víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í byggisamtyktini er økið lagt av til havnarøki.
Tá bygt verður út á sjógv, skal loyvi fáast frá friðingarmyndugleikunum.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru avsettar 2 mió. til smábátahavn í Álakeri.
Metingar av einari bátahavn í Álakeri vísa, at tað verður pláss fyri millum 200- og 250 bátum, alt eftir bátastødd og hvussu havnin verður skipað við flótibrúgvum.
Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er at gera simulering av Álakeri, fyri at vita um- og hvussu tað ber til at fáa tað kyrt. Kostnaðurin fyri at gera eina simulering er kr. 200.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Mælt verður til at gera byggiprogram.
Eisini verður mælt til at gera simuleringar, at fíggja av íløgum fyri bátahyl í Álakeri.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Simuleringar:**
DHI hevur gjørt simuleringar.
Longri brimgarðurin er, sum verjir bátahylin, kyrrari verður í bátahylinum. Royndir eru gjørdar við 3 ymiskum longdum.
Í fyrsta uppskotinum er innsiglingin til bátahylin 70 m, í næstu royndini er innsiglingin 50 m breið og í triðja uppskotinum er innsiglingin 30 m breið.
Smælari innsiglingin er, betur verður kyrran í bátahylinum, men munurin á kyrruni har innsiglingin er ávikavist 50- og 30 metur er lítil.

Simuleringar er gjørdar við at samanbera kyrruna av verandi bátaplássum í Havn, við bátaplássini í nýggju bátahavnini í Álakeri.
Um tann loysnin, har innsiglingin er 50 metur verður vald, sigur simuleringin, at kyrran verður eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð.
Ein leinging av molanum upp á 20 metur er mett at kosta kr. 1,5 mió

**Byggiprogram (úrdrag):**
Umleið 230 bátapláss, sum øll eru við flótibrúgvar.

Brúgvar og bátabummar vera av sama slagi, sum nýggjasta brúgvin á Skálatrøð.

Økið á landi verður víðka við 2.000 m$^2$.

Fram við sjóvarmálanum verður gjørdur ein 120 m langur grótskrái upp til lendið omanfyri.

Neyðugt verður at dýpa eitt umleið 100 m stórt øki útfyri neystini á vestaru síðu á Álakersvík niður á 2 m dýpi.

210 m langt grótkast, sum er 4 m. høgt.

Nýggjur dráttur til kappróðrarbátar.

Streymúttøk og vatn til bátar, verður á øllum brúgvunum.

Arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Licitatión í februar 2020.

Arbeiðið liðugt í apríl 2022.

**Loyvir:**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Byggisamtyktin má regulerast.
Byggiloyvi.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019,
at projektera og bjóða arbeiðið út
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tá projekteringin er liðug, er kanska rættast at leggja málið aftur fyri nevndina, har støða verður tikin til at bjóða arbeiðið út.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

| | |
| --- | --- |
| Avsett í fíggjarætlan 2019: | 2.000.000 |
| Brúkt til simuleringina | 112.000 |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | 345.000 |
| Eftir til projektering og fyrireiking | 1.543.000 |

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019
at projektera

at søkja um, og fáa neyðug loyvir.
at játta í mesta lagi kr. 1.543.000 til projektering og fyrireiking

**Vinnunevndin 27. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2020, eru 10 mió avsettar til bygging av smábátahavn í Álakeri.

Projekteringin er komin so langt, at arbeiðið væntandi kann bjóðast út primo mars 2020.

Í fyrsta umfari er ætlanin at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum.

**Tilmæli frá havnarmeistranum**: Mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og málið kemur fyri aftur í vinnunevndini á fyrst komandi fundi til kunningar.

**Ískoyti:**
Tað fyrsta byggistigið, sum er at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum krevur ikki nógv arbeiðsfólk. Tað merkir, at tað helst eru fleiri fyritøkur, sum kunnu útføra arbeiðið. Ein máti at fáa fleiri fyritøkur at bjóða, er at bjóða út í almennum útboði.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Í staðin fyri at bjóða út í innbodnari licitatión, verður mælt til at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Málið bleiv útsett.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari licitatión millum 7 arbeiðstakarar og licitatiónin varð hildin hin 28. apríl á Havnaskrivstovuni. Hesi tilboð komu inn (j.nr. 19/00083-16):

| **Arbeiðstakari** | **Tilboðsupphædd** | |
|---|---|---|
| SP/F Plan | kr. | 24.683.681,30 |
| SP/F Maskingrevstur | kr. | 26.119.645,00 |
| Andrias Berg SP/F | kr. | 17.604.145,00 |
| Sp/f Ian Rasmussen | kr. | 15.270.060,00 |
| SP/F Grettir | kr. | 17.494.690,00 |
| P/F Tórhall Hansen | kr. | 14.006.468,00 |
| Spf Konsax | kr. | 16.222.063,27 |
| Sp/f Ian Rasmussen, Alternativt boð | kr. | 14.007.863,00 |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini og mælir í skrivi dagfest 30/4, j.nr. 19/00083-17 til at taka av lægsta tilboð frá Tórhalli Hansen áljóðandi kr 14.006.468,00.

Tórshavnar Havn og ráðgevin hava havt innleiðandi samráðingar við P/F Tórhall Hansen um ymisk viðurskifti, m.a. tíðarætlanina. Tíðarætlanin fyri arbeiðstøkuna var upprunaliga sett til 8 mánaðir frá 1. mai

2020 og árið út. Vit eru farin framvið 1. mai 2020 og tí er ikki realistiskt at fáa arbeiðið liðugt til 31/12-2020. Tað tekur eisini tíð at starta arbeiðið upp, og summarfrítíðin stendur fyri framman. Mett verður tí, at ein tíðarætlan á 10 mánaðar frá 1. juli er meiri realistisk. Arbeiðið verður tá liðugt 30/4-2021.

Sum nevnt í málslýsingini umfatar útbodna arbeiðið at gera brimgarð og økið fram við landi, t.e. grótskrái, trappur, gongubreyt, kantsteinar, fundament til ljóssteyrar og festir til bátabrúgvar.
Tað sum síðani er eftir at gera, er at útvega sjálvar bátabrúgvarnar, tekniskar installatiónir (el og vatn) umframt liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering v.m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

| **Kostnaður** | |
|---|---|
| Tilboð Arbeiðstøka P/F Tórhall Hansen | 14.006.468 kr |
| Ókent (8%), fyrireiking og projektering, fakeftirlit og byggileiðsla | 2.068.500 kr |
| Aldusimulering | 112.000 kr |
| **Kostnaður í Alt** | **16.187.000 kr** |
| | |
| **Fígging** | |
| Avsett á FÆ 2019 til bátahyl í Álakeri | 2.000.000 kr |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | -345.000 kr |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | -600.000 kr |
| Avsett á FÆ 2020 til bátahyl | 10.000.000 kr |
| **Tøk fígging í alt í 2020** | **11.055.000 kr** |
| | |
| **Írestandi fígging** | **5.132.000 kr** |
| | |

Á langtíðaríløguætlanini eru í 2021 avsettar 15 mió. kr. til bátahyl í Álakeri.

**Tilmæli**
Havnameistarin mælir til:

- At taka av tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 14.006.467,00 og gera sáttmála um arbeiðið
- At játta kr 10.000.000 av løgukarminum í 2020 deild 7476 smábátahavnir.
  At avseta og játta kr 5.132.000 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2021.

**Vinnunevndin 11. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fara í samráðingar við arbeiðstakaran um møguleikan at flyta grótið til bátahylin við báti av Glyvursnesi.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá vinnunevndini, ið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Málið beint í býráðið umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi byggiloyvi til bátahylin í Álakeri, so hevur kommunan fingið eina umsókn frá Tórshavnar Havn, j.nr. 20/01445. Hendan umsókn verður viðgjørd, lýst og løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið í avvarandi nevndir áðrenn endaliga støðutakan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og ongari blankari og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

Ískoyti:
**Dýping við bátabrúgv**
Við tað innastu bátabrúnna, sum skal leggjast út í Álakeri, verða umleið 34 bátapláss, alt bátastøddini.
Í einum parti av bátabrúnni er tað so grunt, at 7 bátapláss fella burtur, sum merkir at tað ikki verða meira enn 27 pláss.

**Dýping framman fyri neyst:**
Framman fyri tey sunnastu neystini koma fleiri kneysar undan á fjøru, soleiðis at tað er trupult at fóta bátin, seliga á fjøru.
Tað er eitt ynski frá neystamonnunum at fáa dýpt.

Áðrenn arbeiðið bleiv boðið út, var møguleikin at dýpa við spreinging umrøddur, men gingið var burtur frá hesum, tí tryggingar treytirnar vóru so strangar, tí oljutangarnir vóru so tætt uppat.

Ein annar møguleiki er at brekka við einari stórari maskinu, men tað er trupult at geva eitt tilboð upp á hetta.

P/F Tórhall Hansen, sum stendur fyri arbeiðinum at gera brimgarðin, metur at arbeiðið kann gerast fyri kr. 250.000.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta kr.250.000 til arbeiðið, sum verða fíggjaðar av konto 7476 smábátahavnir, L00001 løgukarmar fyri árið.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera grótkast, verður væntandi liðugt seint í summar.

Næsta byggistigið er liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering, ljós og tekniskar installatiónir v.m.

Hetta arbeiðið er um at verða klárt at bjóða út.

**Tilmæli frá havnameistaranum**: Mælt verður til at arbeiðið, at gera bátaøkið á landi í Álakeri, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Havnanevndin 11. mai 2021:** Nevndin mælir til at samráðast víðari við entreprinørin um avtalu um liðugtgerð av arbeiðinum.

**Ískoyti:**.

Verandi støða í játtan:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Avsett fyri árini 2019, 2020 og 2021: | | | | 27.000.000 |
| Játtað: | | | | |
| Fyrireiking projektering | 1.431.000 | | | |
| Simulering | | 112.000 | | |
| Arbeiðstøka P/FTórhall Hansen | 15.132.000 | | | |
| Dýping | | 250.000 | | |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | | 345.000 | | |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | | 600.000 | | |
| Flutt til víðkan av sølutorginum í Vágsb. | 2.076.000 | | 19.946.000 | |
| Eftir av áður avsett. | | | | 7.054.000 |

Liðugtgerð av arbeiðinum sum er eftir er deilt upp í trý:

- Avrætting og regulering av lendi, avvatning og asfaltering.
- Ljós og tekniskar instalatiónir
- Bátabrúgvar og bummar.

**Avrætting og regulering av lendi, avvatning, reinsiverk og asfaltering v.m:**
Samráðingar hava verið við entreprenørin, P/F Tórhall Hansen, sum ger fyrsta byggistigið, at gera brimgarðin.
P/F Tórhall Hansen kann gera arbeiðið fyri kr.8.626.455,-

*Róðrarfelagið Knørrur:* Í nógv ár hevur Róðrarfelagið Knørrur havt ynski um, at fáa ávíst eitt hóskandi øki til bygging av neysti.
Í sambandi við útbyggingina av bátahylinum í Álakeri, hava fleiri royndir verið gjørdar, fyri at finna eina hóskandi staðseting.
Róðrarfelagið eru nøgdir við eina staðseting oman móti sjónum í tí sunnara horninum út móti brimgarðinum, skrátt niðan fyri neystið hjá Havnar Róðrarfelag.
Her er pláss fyri einum grundstykki upp á umleið 750 m$^2$.
Um semja er um at hetta er tann rætta staðsetingin, eigur fyrireikingin til byggingina at verða gjørd í somu entreprisu. Her í liggur, at tað má gerast ein betongveggur móti jarðarmuninum, sum so eisini kann brúkast sum grund til nýggja neystið.
Hendan broytingin viðførir ein meirkostna, í mun til tilboðið frá P/F Tórhalli Hansen, upp á kr. 500.000,-

**Ljós og tekniska instalatiónir:**
Entreprisan umfatar ljós á økið og bátabrúgvarnar, umframt landstreym til bátabrúgvarnar.
Verandi elveiting til smábátar hevur roynst væl, og verða el-standararnir tí av tí sama slagnum.

Bæði LM og Install kenna til verandi el-standarar, og hevur arbeiðið tí verið boðið út millum teir.
Tilboðið frá LM var upp á kr 2.434.811,27 og tilboðið frá Install var upp á kr 1.763.024

**Bátabrúgvar, bummar og dráttur til róðrarfeløgini**
Tað eru fleiri nýggjar brúgvar komnar seinnu árini, eins og stórur partur av bátabummunum eru nýggir. Hvørki bátabrúgvar ella bummar verða gjørdir í Føroyum. Nógv at teimum bummunum, sum eru keyptir til Føroyar seinnu árini, hava ikki havt tann ynskta kvalitetin, sum krevst til tað føroyska veðurlagið, tí hevur Tórshavnar havn, saman við einum svenskum ráðgevara, tillagað teir bummarnar, sum vit nú hava og hava havt góðar royndir av. Saman við tí svenska rágevaranum, hava vit fingið prís upp á 430 metrar av bátabrúgvum og bátabummar til umleið 200- 220 bátar og bátadrátt til róðrarfeløgini.

Brúgvarnar eru av merkinum Rixø, meðan bummarnir og bátadrátturin verða gjørdir av Wilen Marin AB.

Um so er, at kursurin er tann sami tá vit gjalda, sum hann er nú, kosta bátabrúgvar og bummar, bátadráttur og útlegging íroknað ketur og festir kr. 11.800.000.

Hesin prísurin er treytaður av, at vit lata ordran inn í september í ár, tí tá kann framleiðslan fara fram í vetur, tá tað ikki er so stórt trýst á framleiðsluni.
Um vit lata ordran inn í september 2021, og rinda eitt gjald upp á kr. 2,5 millión, kunna brúgvar og bummar latast okkum í apríl- mai 2022.
Um vit bíleggja fyrst í 2022, kunnu vit ikki vanta át fáa brúgvar o.a, fyrr enn oktober-november 2022, og helst til ein hægri prís

Mælt verður til at taka av tilboðunum frá Rixø og Wielen Marin AB.

Áðrenn brúgvarnar koma, skulu ketur og botnfestir gerast, og síðani skulu brúgvarnar fáast upp á pláss og bummar leggjast út.
Starvsfólk hjá Tórshavnar havn hava royndir við hesum arbeiðinum, og er ætlanin at teir skulu standa fyri hesum arbeiðinum, og leiga útgerð og fólk uttanífrá eftir tørvi.

**Byggilleiðsla og óvantað:**
Óvantað eftirlit og byggileiðsla er mett til kr.2.250.000

Samlaður kostnaður:

| | |
|---|---|
| Lendisarbeiði | 8.623.455 |
| Grundøki Knørrafelagið | 500.000 |
| El- og instalatiónir | 1.763.000 |
| Brúgvar og bummar | 11.800.000 |
| Byggileiðsla og óvantað | 2.250.000 |
| Samlaður kostnaður | 24.936.455 |

| | | |
|---|---|---|
| Eftir av játtan upp á 27 mió eru | kr | 7.054.000 |
| Samlaður kostnaður fyri 2. byggistig | kr | 24.936.455 |
| Manglandi játtan | kr | 17.882.455 |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta kr 24.936.455 til liðugtgerð av bátahylinum í Álakeri.

At liðugtgerðin verður fíggjað við kr. 7.054.000 í 2021 deild 7476 smábátahavnir,
og at avseta kr 17.882.455 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2022.

At seta bátabrúgvar og bátabummar í ordra í sept/okt 2021, og samstundis rinda 2,5 mió. í depositum.

**Havnanevndin 16. september 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur undir at bíleggja bátabrúgvarnar, men at arbeiðið til lendið skal bjóðast út eftirsum tíð er til tað og møgulig sparing er í hesum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Elsu Berg: Mælt verður til at taka undir við at bíleggja bátabrúgvarnar, men at arbeiðið til lendið skal bjóðast út eftirsum tíð er til tað og møgulig sparing er í hesum
Broiytingaruppskotið fall við 5 akvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvødd: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**

Spreinging frammanfyri neystunum í Álakeri
Ynskiligt er at dýpa eitt størri økið enn upprunaliga ætlað frammanfyri neystunum í Álakeri umframt eitt øki sunnanfyri verandi drátt. Endamálið er at gera tað høgligari at flota bát úr neystunum; at gera umstøðurnar tryggari við at minka um vandan fyri at ásigling, og fyri betri at kunna gagnnýta økið innanfyri norðastu bátabrúnna og økið sunnanfyri dráttin. Talan er í alt um umleið 300 m$^2$, ið kann dýpast við spreinging.
Best er at hetta spreingiarbeiðið verður gjørt komandi vár, bæði í mun til verandi arbeiðsstøðu í verkætlanini og tí at um várið er meiri fjøra og harvið betri at arbeiða í sjónum.
Kostnaðarmetingin fyri at spreingja hetta økið er áljóðandi 0,6 mió.kr og mælt verður til, at fígging til hetta arbeiðið verður avsett av íløgum á fíggjarætlanini fyri 2023.

Broyting av staðseting til róðrafeløguni:
Samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu, Havnar Róðrarfelag og Róðrarfelagið Knørrur um at Havnar Róðrarfelag eisini skal hava møguleika at byggja bátahøll niðri við sjóvarmálan í Álakeri. Hetta kann lata seg gera við at bæði róðrarfeløgini fáa hvør sítt grundøki á áleið 600 fermetrar.
Hettar krevur ávísar broytingar í núverandi projekti. Tórshavnar havn hevur fingið tilboð frá arbeiðstakaranum uppá neyðugar broytingar (J.nr. 19/00083-38), ið er áljóðandi kr 1.301.000,-

*Fígging:*

Higartil eru játtaðar í alt 41,973 mió.kr. til bátahylin í Álakeri í fíggjarætlanunum 2019-2022. Av hesi játtan eru uml. 40,440 mió.kr bundið við avtalum og væntaðum prísvøkstri. Eftir til ókendar útreiðslur er sostatt uml. 1,5 mió.kr í verandi støðu.

Á játtanarkarminum LK74010 "Bátahylur í Álakeri" standa kr. 805.000.

Nakrar verkætlanir á deild 7476 "Smábátahavnir" eru lidnar og skulu lokast. Avlop frá hesum verkætlanum kann flytast til bátahylin í Álakeri. Talan er um hesar verkætlanir:

| Verkætlan | Avlop |
|---|---|
| L74007: Bátahylur við Sjógv | 111.000 kr |
| L74011: Bátahylur í Kaldbaksbotni | 67.000 kr |
| L74013: Bylgjubrótari í Kollafirði | 6.000 kr |
| Avlop í alt | 184.000 kr |

Upphæddin sum restar í til neyðugu broytingina av staðsetingina av neystunum, er:

Kr. 1.301.000 – (kr. 805.000 + kr. 184.000) = kr. 312.000

Ið umsitingin metir kann fíggjast innanfyri tær 1,5 mió, sum eru eftir til ókent í verkætlanimi.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til:
- At játta kr. 805.000,- av løgukarmi LK74010 til verkætlan L74010 "Bátahylur í Álakeri",
- At samlaða avlopið á verkætlanunum L74007, L74011 og L74013, í alt kr 184.000, verður flutt til verkætlan L74010 " Bátahylur í Álakeri.
- At avseta og játta kr 0,6 mió av løgum í FÆ 2023 til spreinging í bátahylinum í Álakeri.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. september 2022:**
**Ein meiriluti:** Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Kári Johansen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum tí hildið eigur at verða í fast í upprunaætlanini, sum umfataði eitt uppihaldsøki.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, tí hildið eigur at verða fast í upprunaæltlanini, sum umfataði eitt uppihaldsøki.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 3 blonkum atkvøðum.

Atkvøddi: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

# 211/22 Bátahylur við Sjógv. Umlegging frá teymum til bátabrúgvar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 3/16 | 16/00212-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 08.02.2016 | 6/16 | 16/00212-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 71/16 | 16/00212-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 67/16 | 16/00212-1 |
| 5 Vinnunevndin | 29.11.2016 | 42/16 | 16/00212-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 431/16 | 16/00212-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 14/17 | 16/00212-1 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 63/17 | 16/00212-1 |
| 9 Vinnunevndin | 03.04.2017 | 24/17 | 16/00212-1 |
| 10 Havnanevndin | 26.09.2022 | 25/22 | 16/00212-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 230/22 | 16/00212-1 |
| 12 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 211/22 | 16/00212-1 |

**Málslýsing:**
Í bátahylinum við Sjógv eru í dag 54 teymar, ongin er á bíðilista og onki pláss er tókt.

Tað hevur leingi verið eitt ynski frá báteigarunum, at fáa umlagt bátaplássini frá teymum til flótibrúgvar, sum er ein munandi høgligari og tryggari loysn.

Í miðjuni í bátahylinum er ein timburbrúgv, sum er í vánaligum standi.

Um timburbrúgvin, sum er í hylinum, verður tikin burtur, er pláss fyri tveimum flótibrúgvum, har tað kunnu liggja 64 bátar, tað eru 10 fleiri enn nú.

Um brúgvarnar verða á umleið sama støði, sum nýggju brúgvarnar á Argjum ið eru útgjørdar við el steyrum, ljósi og vatni, er samlaði kostnaðurin kr. 3.190.000,-.

Tórshavnar havn hevur áður staðið fyri innkeypi og útlegging av bátabrúgvum, við hjálp frá undirveitarum.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um íløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, verður mælt til at játta kr. 3.190.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 08. februar 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 3.190.000 av konto 7476, smábátahavnir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið í bátahylinum í Kollafirði, at umleggja frá bátateymum til bátabrúgvar, er liðugt.

Sambært byggiroknskapinum kostaði arbeiðið kr 2.940.760,-

Nú arbeiðið er liðugt, er tað eitt stórt ynski frá báteigarunum á staðnum, at gera ein nýggjan bátadráttur, ístaðin fyri tann gamla. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er 400.000 kr.

Tað hevði bøtt nógv um innsiglingina til tann vestara partin av bátahylinum, um nakað av gróti, sum liggur í innsiglingini, hevði blivið burturbeint. Hetta hevði eisini bøtt um umstøðurnar hjá alarunum, sum liggja har tá veðrið er ringt. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er 40.000 kr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eftir av játtan til bátahylin: | | 249.240 | |
| Kostnaður bátadráttur | 400.000 | | |
| Kostnaður burturbeining av gróti | 40.000 | | |
| Óvantað | 20.000 | | |
| Meirjáttan | 460.000 | 249.240 | **210.760** |

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at taka støðu til, um íløgan skal gerast í bátadrátt og burturbeining av gróti, og um játtast skulu 210.760 kr, av konto 7476 bátahavnir.

**Vinnunevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

Tað hava verið ymiskar meiningar um endaligu staðsetingina av bátadráttinum.
Tilmæli um staðseting kemur aftan á fund við Bátafelagið í Kollafirði.

**Vinnunevndin 03. apríl 2017:** Samtykt at dráttur verður gjørdur út ímóti eystara horninum, umleið 12 metur inn í lendið.

**Ískoyti**
Verkætlanin er liðug. Á løgujáttanini L74007 «Bátahylur við Sjógv» er eitt avlop á kr. 111.000.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at loka verkætlanina og flyta avlop kr. 111.000 frá L74007 til L74010 «Bátahylur í Álakeri», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti: Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Birgir Nielsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Elsa Berg atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam og Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Kunnað varð um máið.

## 212/22 Bátahylur í Kaldbaksbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 4/19 | 19/00107-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 27.02.2019 | 2/19 | 19/00107-1 |
| 3 Vinnunevndin | 14.05.2019 | 30/19 | 19/00107-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 154/19 | 19/00107-1 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 134/19 | 19/00107-1 |
| 6 Havnanevndin | 26.09.2022 | 24/22 | 19/00107-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 231/22 | 19/00107-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 212/22 | 19/00107-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan úr Kaldbak í 2013, um at gera grótkast um bátaplássini í Kaldbaksbotni, fyri at verja móti vindi, sum kemur tvørtur um fjørðin.
Aftur í 2017 søkja báteigarar og Kaldbaksnevndin um, at arbeiðið at bøta um bátahylin í Kaldbaksbotni verður gjørt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað liggja 9 bátar í Kaldbaksbotni. Bátarnir liggja á sjónum alt árið. Tað er sera vindhart í Kaldbaksbotni. Tá vindurin liggur tvørtur um fjørðin, er tað serliga trupult at liggja á plássunum fram við vegnum, tí vindurin trýstir bátarnar inn móti landi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Tað eru ongar ásetingar í Byggisamtyktini í Kaldbaksbotni, sum loyva virksemi fram við sjónum, og tí má byggisamtyktin helst broytast.
Bygging út á sjógv, krevur loyvi frá friðingarnevndini.
Hetta er bygging fram við landsvegi, og krevur tí loyvi frá Landsverk.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 er avsett 1,2 mió til smábátahavn í Kaldbaksbotni.
Tá komið verður nakað úr landi við bryggjuna í Kaldbaksbotni, dýpur tað rættiliga skjótt. Hetta merkir, at eitt møguligt grótkast verður nógv dýrari enn tann avsetta upphæddin.

Sum ein alternativ loysn, ber til at útleggja ein 40 m langan flótandi bylgjubrótara, sum í hesum førinum kann verja móti vindvánni tvørtur um fjørðin.
Hóast ein bylgjubrótari verður lagdur út, verður tað framvegis avbjóðandi at liggja í Kaldbaksboti í nógvum vindi.
Tað ber til at leggja umleið 3 bátar fram við bylgjubrótaranum.
Um bátabummar halda móti tí nógva vindinum, ber tað til, ístaðin fyri tey 3 bátaplássini, at leggja bátabummar, so pláss verður fyri umleið 8 bátabummum afturat.

Kostnaðarmeting fyri loysnina við bylgjubrótara er mett til 1,5 mió, tá eru møguligir bátabummar ikki íroknaðir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Við teirri grundgeving, at býráðið hevur avgjørt at bøta um bátahylin í Kaldbaksbotni, verður mælt til at arbeiða víðari við loysnini at útleggja ein 40 m langan flótandi bylgjubrótara, og at fáa tey neyðugu loyvini, og at beina málið í Kaldbaksnevndina.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 27. februar 2019:** Nevndin tekur undir við ætlanini um teir persónarnir, sum søktu kommununa um útbygging av bátahylinum, viðmæla ætlanini.

**Ískoyti:**
Øll neyðug loyvir eru fingin.

Mettur kostnaður fyri projektið er kr. 1.545.500

Um peningur verður játtaður, kann arbeiðið setast í verk.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 1,2 mió til smábátahavn í Kaldbaksbotni og 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

Hóast írestandi fíggingin upp á (1.545.500 – 1.200.000) kr. 345.000 verður tikin av projektinum fyri smábátahavn í Álakeri, ber tað til at fyrireika útbjóðingina av bátahavn í Álakeri.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at seta arbeiði, at útleggja ein 40 m langan bylgjubrótara í Kaldbaksbotni, í verk.

Arbeiðið verður fíggjað soleiðis:

§ 7 Kommunal virki
Konto 7476 Fyrireiking av bátahyli í Kaldbaksbotni 1.200.000

| | | |
|---|---|---|
| Konto 7476 | Smábátahavn | 345.500 |
| | Tilsamans | 1.545.500 |

**Vinnunevndin 14. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er liðug. Á løgujáttanini L74011 «Bátahylur í Kaldbaksbotni» er eitt avlop á kr. 67.000.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at loka verkætlanina og flyta avlop kr. 67.000 frá L74011 til L74010 «Bátahylur í Álakeri», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. september 2022:**

**Ein meiriluti:** Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Birgir Nielsen samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam og Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Kunnað varð um málið.

# 213/22 Bylgjubrótari til bátahylin við Sjógv í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 4/20 | 20/00001-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 1/20 | 20/00001-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 5/20 | 20/00001-1 |
| 4 Havnanevndin | 26.09.2022 | 23/22 | 20/00001-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 232/22 | 20/00001-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 213/22 | 20/00001-1 |

**Upprunin til málið:**
Tað hevur verið eitt ynski frá bátaeigarum, at fáa vart innsiglingina móti vindi av útsyðningi og vestri.

**Lýsing av málinum – samandráttur:** Tað eru 64 bátapláss í bátahylinum. Í 2016 blivu nýggjar bátabrúgvar við tilhoyrandi bátabummum lagdar út í bátahylinum. Útsyðningur og vestan liggur rættuliga tráður inn í innsiglingina, og ger at tað blívur óslætt í pørtum av bátahylinum.

**Lógir, ásetingar o.a.:** Byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:** Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Í fíggjarætlanini fyri 2020 er avsett 1,6 mió til bylgjubrótara í Kollafirði.

Tað eru tveir møguleikar at verja innsiglingina móti vindvánni, sum kemur út eftir fjørinum, annar er grótkast og hin er ein flótandi bylgjubrótari.
Metingar av kostnaðinum vísa, at eitt 60 m langt grótkast kostar 3.1 mió., meðan ein tilsvarandi langur flótandi bylgjubrótari kostar 1,6 mió.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Við teirri grundgeving, at býráðið hevur avgjørt at seta 1,6 mió av til verkætlanina, verður mælt til at seta ætlanina í verk, at útleggja 60 m av flótandi bylgjubrótara, fyri í mesta lagi 1,6 mió.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er liðug. Á løgujáttanini L74013 «Bylgjubrótari í Kollafirði» er eitt avlop á kr. 6000.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at loka verkætlanina og flyta avlop kr. 6.000 frá L74013 til L74010 «Bátahylur í Álakeri», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 26. september 2022:**

**Ein meiriluti:** Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Birgir Nielsen samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam og Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam og Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Kunnað varð um málið.

## 214/22 Broyting í reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 08.06.2022 | 16/22 | 22/02186-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 167/22 | 22/02186-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 166/22 | 22/02186-1 |
| 4 Havnanevndin | 29.08.2022 | 19/22 | 22/02186-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 227/22 | 22/02186-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 214/22 | 22/02186-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur er á at gera ávísar broytingar í reglugerðini um nýtslu av bátaplássum.

**Lýsing av málinum**
Galdandi reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum kom í gildi 1. mars 2014 og avloysti reglugerð frá 1. januar 2008.
Tørvur er á einstøkum dagføringum í reglugerðini. Hesar broytingar eru:

1. Forboð móti at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu

Tað eigur ikki at verða loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, hvørki fast ella í sambandi við útleigan til ferðavinnuendamál.

Tískil verður skotið upp at innseta nýtt stk. 8 og nýtt stk. 9 í § 1 í reglugerðini:

> *Stk.8. Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.*
>
> *Stk. 9. Tað er ikki loyvt at nýta bátaplássið til ferðavinnuendamál, ið umfatar gisting umborð á bátinum í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, herundir, men ikki avmarkað til, útleigan av báti gjøgnum Airbnb og líknandi skipanir.*

2. At "medeigari" kann yvirtaka bátapláss, treytað av skjalprógvi.

Sambært galdandi reglugerð kann báteigari einans lata hjúnarfelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátapláss. Í ávísum førum kann hendan áseting verða óheppin, um fleiri eigarar hava verið felags um bátin, men bert tann eini stendur fyri bátaplássinum

Tískil verður skotið upp at broyta § 2 stk. 5, ið er soljóðandi:

> *"Stk.5 Báteigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið."*

Til soljóðandi:

> *"Stk. 5. Eftir umsókn kann medeigarin yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið, treytað av, at skjalprógv er latið Th minst 5 ár frammanundan, ið prógvar, at medeigarin eigur hálvpart (50%) í bátinum, sum brúkar plássið."*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, dagfest 1. mars 2014.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- J.Nr. 22/02186-2 : Galdandi reglugerð fyri nýtslu av bátaplássi í Tórshavnar kommunu
- J.Nr. 22/02186-3 : Uppskot til broytta reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisavleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at reglugerðin um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu verður broytt soleiðis sum greitt er frá í lýsingini av málinum, t.v.s. at í § 1 í reglugerðini verður innsett nýtt stk. 8 og nýtt stk. 9, ið eru soljóðandi:

*Stk.8. Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.*

*Stk. 9. Tað er ikki loyvt at nýta bátaplássið til ferðavinnuendamál, ið umfatar gisting umborð á bátinum í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, herundir, men ikki avmarkað til, útleigan av báti gjøgnum Airbnb og líknandi skipanir.*

Harumframt at broyta § 2 stk. 5, ið er soljóðandi:

*"Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið."*

Til soljóðandi:

*"Stk. 5. Eftir umsókn kann medeigarin yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið, treytað av, at skjalprógv er latið Th minst 5 ár frammanundan, ið prógvar, at medeigarin eigur hálvpart (50%) í bátinum, sum brúkar plássið."*

Og at enda, at § 13 verður broytt til:

*Reglugerðin kemur í gildið tann 1. juni 2022*

*Stk.2 Reglugerðin, fyri leigarar av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. mars 2014, fer samstundis úr gildi.*

**Havnanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at medeigarin minimum eigur 25% í bátinum stk. 5 í kunngerðini. Reglugerðin kemur í gildið 1. juli 2022, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í havnanevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Nýtt uppskot til broyting í reglugerðini er gjørt, j.nr. 22/02186-7.

Verandi reglugerð frá 2014 er soljóðandi:

***"Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu***

*Hendan reglugerð er galdandi fyri allar báteigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu. Tað er Tórshavnar havn, sum umsitur bátaplássini.*

***§ 1***
*Báteigarar hava skyldu til at fara væl um bátaplássið, økið á landi og flótibrýrnar.*

*Stk.2 Tað er ikki loyvt at hava amboð, fiskireiðskap ella nakað annað tilfar liggjandi á landi við bátaplássið ella á flótibrúgvunum.*
*Allir slíkir lutir ella tilfar verður uttan ávaring fyribeint fyri eigarans rokning og ábyrgd.*

*Stk.3 Tað er strangliga bannað at koyra garnar, høvd ella annað á sjógv innan fyri brimgarðarnar.*

*Stk.4 Báteigararnir hava skyldu til at halda bátin lens, at binda hann soleiðis, at endarnir liggja væl og ikki slítast óneyðugt, og at hann ikki er til ampa fyri onnur ella kemur at skaða aðrar bátar ella ognir í havnini.*

*Stk.5 Tá siglt verður inni í havnini, skal ferðin verða so lítil sum gjørligt, soleiðis at aðrir bátar, ið sigla ella liggja bundnir, ikki skulu fáa skaða.*

*Stk.6 Báteigarar hava skyldu at akta boðini frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur.*

*Stk.7 Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv letur Th árliga eitt kjølsvín til hvønn bátin. Tað er skylda hjá øllum báteigarum, at hava hetta liggjandi í kjølinum.*

***§ 2***
*Báteigarin hevur rætt til at nýta bátaplássið til bát, sum hann sjálvur eigur hálvpart ella meira av.*

*Stk.2 Th kann undantaksvís geva loyvi til, at bátaeigari, ið eigur minni enn hálvpart, hevur rætt til at brúka plássið.*

*Stk.3 Th kann altíð krevja nøktandi skjalprógv fyri eigaraviðurskiftunum í bátinum.*

*Stk.4 Eftir umsókn kann bátaeigarin lata hjúnafelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið.*

*Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið.*

***§ 3***

*Bátaeigarin tekur við plássinum í tí standi, tað er, tá hann fær tað. Um bummur/teymur ella annað er brotið/skatt, skal hann gera vart við hetta beinanvegin.*
*Ger hann ikki tað, verður hann mettur at hava ábyrgdina av skaðanum.*

***§ 4***

*Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin, sum t.d. bummar, festir og á aðrar bátar uttan so, at hesir koma av illveðri ella øðrum, sum bátaeigarin ikki hevur ábyrgdina av.*

*Stk.2 Th skal bøta um teir skaðar, ið stava frá illveðri, vanligum sliti og elli.*

***§ 5***

*Um bátaeigarin ikki eigur bát, tá hann fær bátaplássið, skal hann ogna sær bát innan ½ ár frá tí, hann hevur fingið boð um, at hann hevur fingið bátapláss.*

*Stk.2 Um bátaeigarin selur bát sín, skal hann beinanvegin skrivliga boða Th frá.*

*Stk.3 Hevur bátaeigarin ikki, áðrenn ½ ár frá søludegnum at rokna, fingið sær annan bát, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur, og Th letur øðrum bátaeigara tað.*
*Bátaeigarin hevur tó loyvi at selja part í bátinum, men má sjálvur altíð eiga hálvpart ella meira í bátinum, sí tó §2 stk.2 Søla av parti í bátinum skal altíð fráboðast Th beinanvegin.*

*Stk.4 Um bátaeigari í meira enn ½ ár ikki hevur nýtt bátaplássið til egnan bát, hevur Th rætt at uppsiga leigumálið, og lata øðrum umsøkjara bátaplássið.*

*Stk.5 Bátaeigari, sum ætlar at keypa størri/minni bát, skal skrivliga søkja Th um størri/minni pláss. Umsókn um broyting av bátaplássi verður tillutað eftir aldrinum á umsóknini.*

***§ 6***

*Um bátaeigarin ikki fer at nýta plássið í 20 samanhangandi dagar ella meira, hevur hann skyldu til beinanvegin at boða Th frá.*

*Stk.2 Th hevur rætt til at lata onnur nýta bátaplássið, uttan at bátaeigarin fær leiguna endurgoldna fyri tað tíðarskeiðið.*

***§ 7***

*Bátaeigarin kann lata bátaplássið aftur til tann 1. í einum mánaða.*

***§ 8***

*Um Th skal brúka økið til okkurt annað, ella neyðugt verður at flyta bátaplássini av øðrum orsøkum, hevur Th rætt til at taka bátaplássið aftur við 3 mánaða ávaring.*

***§ 9***

*Leiga verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss í Tórshavnar kommunu.*

***§ 10***

*Hóast Th hevur 3 mánaða uppsagnartíð, kann Th, aftan á skrivliga ávaring, taka plássið aftur, um reglugerðin verður brotin.*

*Brot á reglugerðina kann fevna um, men er ikki avmarkað til:*

*Stk.2 Um leiga ikki er goldin, eftir at leigarin hevur móttikið 3. rykkjaran, sum verður sendur sum innskrivað bræv, verður bátaplássið tikið inn og latið øðrum umsøkjara.*

*Stk.3 Um leigarin fremur onnur brot á reglugerðina og ikki beinanvegin heldur uppat við tí, hóast hann hevur fingið skrivliga ávaring.*

*Stk.4 Um leigarin ikki aktar boð frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur í annað pláss, støðugt ella fyri eitt stytri tíðarskeið.*

***§ 11***

*Um bátaeigarin flytur úr kommununi, verður bátaplássið tikið aftur uttan ávaring.*

***§ 12***

*Tá ið bátaplássið er latið/tikið aftur, hevur bátaeigarin skyldu til at flyta bátin beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, verður báturin tikin upp á land fyri bátaeigarans rokning.*

***§ 13***

*Reglugerðin kemur í gildið tann 1. mars 2014*

*Stk.2 Reglugerðin, fyri leigarar av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. januar 2008, fer samstundis úr gildi."*

Uppskotið til nýggja reglugerð er soljóðandi:

**Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu**

Hendan reglugerð er galdandi fyri allar bátaeigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu. Tað er Tórshavnar havn, sum umsitur bátaplássini.

**§ 1**

Bátaeigarar hava skyldu til at fara væl um bátaplássið, økið á landi og flótibrýrnar.

Stk.2 Tað er ikki loyvt at hava amboð, fiskireiðskap ella nakað annað tilfar liggjandi á landi við bátaplássið ella á flótibrúgvunum.
Allir slíkir lutir ella tilfar verður uttan ávaring fyribeint fyri eigarans rokning og ábyrgd.

Stk.3 Tað er strangliga bannað at koyra garnar, høvd ella annað á sjógv innan fyri brimgarðarnar.

Stk.4 Bátaeigararnir hava skyldu til at halda bátin lens, at binda hann soleiðis, at endarnir liggja væl og ikki slítast óneyðugt, og at hann ikki er til ampa fyri onnur ella kemur at skaða aðrar bátar ella ognir í havnini.

Stk.5 Tá siglt verður inni í havnini, skal ferðin verða so lítil sum gjørligt, soleiðis at aðrir bátar, ið sigla ella liggja bundnir, ikki skulu fáa skaða.

Stk.6 Bátaeigarar hava skyldu at akta boðini frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur.

Stk.7 Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv letur Th árliga eitt kjølsvín til hvønn bátin. Tað er skylda hjá øllum bátaeigarum, at hava hetta liggjandi í kjølinum.

Stk.8. Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.

**§ 2**

Bátaeigarin hevur rætt til at nýta bátaplássið til bát, sum hann sjálvur eigur fjórðingspart ella meira av.

Stk.2 Strikað

Stk.3 Th kann altíð krevja nøktandi skjalprógv fyri eigaraviðurskiftunum í bátinum.

Stk.4 Eftir umsókn og við skrivligari góðkenning frá øllum skrásettum medeigarum, kann bátaeigarin lata hjúnafelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið.

Stk.5 Skrásettur medeigari, sum í minsta lagi 5 ár frammanundan hevur átt í minsta lagi fjórðingspart í báti, kann eftir umsókn og við skrivligari góðkenning frá øllum skrásettum medeigarunum í bátinum, yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið. Medeigarin, ið yvirtekur nýslurættin, verður hereftir skrásettur sum bátaeigarin í mun til rættindi og skyldur sambært hesi reglugerð.

**§ 3**

Bátaeigarin tekur við plássinum í tí standi, tað er, tá hann fær tað. Um bummur/teymur ella annað er brotið/skatt, skal hann gera vart við hetta beinanvegin.
Ger hann ikki tað, verður hann mettur at hava ábyrgdina av skaðanum.

**§ 4**

Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin, sum t.d. bummar, festir og á aðrar bátar uttan so, at hesir koma av illveðri ella øðrum, sum bátaeigarin ikki hevur ábyrgdina av.

Stk.2 Th skal bøta um teir skaðar, ið stava frá illveðri, vanligum sliti og elli.

**§ 5**

Um bátaeigarin ikki eigur bát, tá hann fær bátaplássið, skal hann ogna sær bát innan ½ ár frá tí, hann hevur fingið boð um, at hann hevur fingið bátapláss.

Stk.2 Um bátaeigarin selur bát sín, skal hann beinanvegin skrivliga boða Th frá.

Stk.3 Hevur bátaeigarin ikki, áðrenn ½ ár frá søludegnum at rokna, fingið sær annan bát, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur, og Th letur øðrum bátaeigara tað.
Bátaeigarin hevur tó loyvi at selja part í bátinum, men má sjálvur altíð eiga fjórðingspart ella meira í bátinum. Søla av parti í bátinum skal altíð fráboðast Th beinanvegin.

Stk.4 Um bátaeigari í meira enn ½ ár ikki hevur nýtt bátaplássið til egnan bát, hevur Th rætt at uppsiga leigumálið, og lata øðrum umsøkjara bátaplássið.

Stk.5 Bátaeigari, sum ætlar at keypa størri/minni bát, skal skrivliga søkja Th um størri/minni pláss. Umsókn um broyting av bátaplássi verður tillutað eftir aldrinum á umsóknini.

**§ 6**

Um bátaeigarin ikki fer at nýta plássið í 20 samanhangandi dagar ella meira, hevur hann skyldu til beinanvegin at boða Th frá.

Stk.2 Th hevur rætt til at lata onnur nýta bátaplássið, uttan at bátaeigarin fær leiguna endurgoldna fyri tað tíðarskeiðið.

**§ 7**

Bátaeigarin kann lata bátaplássið aftur til tann 1. í einum mánaða.

**§ 8**

Um Th skal brúka økið til okkurt annað, ella neyðugt verður at flyta bátaplássini av øðrum orsøkum, hevur Th rætt til at taka bátaplássið aftur við 3 mánaða ávaring.

**§ 9**

Leiga verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss í Tórshavnar kommunu.

**§ 10**

Hóast Th hevur 3 mánaða uppsagnartíð, kann Th, aftan á skrivliga ávaring, taka plássið aftur, um reglugerðin verður brotin.

Brot á reglugerðina kann fevna um, men er ikki avmarkað til:

Stk.2 Um leiga ikki er goldin, eftir at leigarin hevur móttikið 3. rykkjaran, sum verður sendur sum innskrivað bræv, verður bátaplássið tikið inn og latið øðrum umsøkjara.

Stk.3 Um leigarin fremur onnur brot á reglugerðina og ikki beinanvegin heldur uppat við tí, hóast hann hevur fingið skrivliga ávaring.

Stk.4 Um leigarin ikki aktar boð frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur í annað pláss, støðugt ella fyri eitt stytri tíðarskeið.

**§ 11**

Fyri at fáa tillutað nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu skal bátaeigarin hava fastan bústað í Tórshavnar kommunu.

Stk.2 Um bátaeigarin flytur úr kommununi, verður bátaplássið tikið aftur uttan ávaring.

Stk.3 Skrásettir medeigarar skulu hava fastan bústað í Tórshavnar kommunu.

**§ 12**

Tá ið bátaplássið er latið/tikið aftur, hevur bátaeigarin skyldu til at flyta bátin beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, verður báturin tikin upp á land fyri bátaeigarans rokning.

**§ 13**

Reglugerðin kemur í gildið tann 1. november 2022

Stk.2 Reglugerðin fyri nýtslu av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. mars 2014, fer samstundis úr gildi.*“*

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

*<u>§1: Stk.8.</u> Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.*

Ásetingin hevur til endamáls at forða fyri, at fólk kunnu fáa sær bústað umborð á báti, ið verður mett at vera óheppið í mun til skilhald og heilsufrøðilig viðurskifti.

§ 2 stk.1: *Bátaeigarin hevur rætt til at nýta bátaplássið til bát, sum hann sjálvur eigur fjórðingspart ella meira av.*

Broyting: Hálvpartur er broytt til fjórðingspart. Broytingin er ein konsekvensrætting av ásetingini í § 2 stk. 5 um at medeigari nú skal eiga fjórðingspart fyri at kunna yvirtaka bátapláss.

*§ 2 stk.2: (Strikað): Th kann undantaksvís geva loyvi til, at bátaeigari, ið eigur minni enn hálvpart, hevur rætt til at brúka plássið.*

Ásetingin verður strikað, tí hon gevur ikki longur meining, tí loyvt verður medeigara, ið eigur fjórðingspart, at yvirtaka bátaplássið.

*§ 2 stk.4: Eftir umsókn og við skrivligari góðkenning frá øllum skrásettum medeigarum, kann bátaeigarin lata hjúnafelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið.*

Broyting: Orðingin «*og við skrivligari góðkenning frá øllum skrásettum medeigarum» er innsett. Hendan orðing er neyðug, fyri at verja fyri at bátaeigari, ið eigur bát saman við øðrum, letur nýtslurættin til hjúnarfelaga ella sínar lívsarvingar, uttan góðkenning frá hinum medeigarunum.*

§ 2 stk.5: *"Skrásettur medeigari, sum í minsta lagi 5 ár frammanundan hevur átt í minsta lagi fjórðingspart í báti, kann eftir umsókn og við skrivligari góðkenning frá øllum skrásettum medeigarunum í bátinum, yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið. Medeigarin, ið yvirtekur nýslurættin, verður hereftir skrásettur sum bátaeigarin í mun til rættindi og skyldur sambært hesi reglugerð."*

Broyting: Gamla ásetingin,ið var soljóðandi: *"Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið."* er tikin heilt burtur, tí hon ikki longur gevur meining. Ynski er heldur, at medeigari, ið eigur minst fjórðingspart, kann yvirtaka bátaplássið. Ásetingin inniheldur treyt, um at medeigarin skal vera skrásettur sum medeigari í minst 5 ár. Endamálið við hesi treyt er at forða fyri, at bátapláss fara at verða seld saman við bátinum, nú tá ið so nógv standa á bíðilista til bátapláss.
Eisini er treyt um at, at allir eigarar vátta skrivliga, at ávísur medeigari kann yvirtaka bátaplássið, og er hetta fyri at tryggja, at yvirtøka av bátaplássi verður gjørt í semju millum allar eigarar.

§ 5 stk.3: *Hevur bátaeigarin ikki, áðrenn ½ ár frá søludegnum at rokna, fingið sær annan bát, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur, og Th letur øðrum bátaeigara tað.*
*Bátaeigarin hevur tó loyvi at selja part í bátinum, men má sjálvur altíð eiga fjórðingspart ella meira í bátinum. Søla av parti í bátinum skal altíð fráboðast Th beinanvegin.*

Broyting: Hálvpartur er broytt til fjórðingspart. Broytingin er ein konsekvensrætting av ásetingini í § 2 stk. 5 um at medeigari nú skal eiga fjórðingspart fyri at kunna yvirtaka bátapláss.

§ 11 stk.1: *Fyri at fáa tillutað nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu skal bátaeigarin hava fastan bústað í Tórshavnar kommunu.*

Nýggj áseting, hvørs endamál er at nágreina, at tað einans eru borgarar í Tórshavnar kommunu, sum kunnu fáa tilluta bátapláss.

§ 11 stk. 3: *Skrásettir medeigarar skulu hava fastan bústað í Tórshavnar kommunu..*

Nýggj áseting, hvørs endamál er at nágreina, at tað einans eru borgarar í Tórshavnar kommunu, sum kunnu fáa vera skrásettir sum medeigarar í báti, og harvið kunnu yvirtaka bátapláss í Tórshavnar kommunu.

<u>§ 13 stk. 1 og stk.2:</u> *Reglugerðin kemur í gildið tann 1. november 2022*

*Reglugerðin fyri nýtslu av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. mars 2014, fer samstundis úr gildi.*

Broyting av dagfesting fyri gildiskomu av reglugerðini.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við broytta uppskotinum til reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu (j.nr. 22/02186-7), og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 215/22 Havnar Róðrarfelag - Umsøkn um Grundøki til bátahøll.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 29.08.2022 | 20/22 | 22/04383-2 |
| 2 Havnanevndin | 26.09.2022 | 26/22 | 22/04383-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 228/22 | 22/04383-2 |
| 4 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 215/22 | 22/04383-2 |

**Upprunin til málið**
Havnar Róðrarfelag hevur søkt um grundøki til bátahøll í Álakeri.

**Lýsing av málinum**
Samráðingar hava verið millum Tórshavnar Kommunu, Tórshavnar havn og Havnar Róðrarfelag síðani mars 2022 um møguleika fyri, at Havnar Róðrarfelag kann fáa loyvi at byggja bátahøll nærri sjóvarmálanum í Álakeri. Hesar samráðingar hava nú ført við sær, at Tórshavnar havn hevur móttikið umsókn um grundøki til hesa bátahøll.
Ætlanin við økinum er, í fyrsta lagi, at byggja eina bátahøll við møguleika fyri at byggja omaná bátahøllina einaferð í framtíðini. Um tað gerst neyðugt og fíggjarliga gjørligt, kann núverandi virksemið flytast frá verandi hølum omaná bátahøllina á tilskilaða økinum.

Havnar Róðrarfelag hevur í longri tíð víst á tørvin á størri hølum vegna vaksandi virksemi. Kommunan hevur játtað Havnar Róðrarfelag byggiloyvi. Byggjast kann sum framhald av verandi neystið vestureftir. Byggiloyvið er tilskilað í journal máli 14/04576-19. Havnar Róðrarfelag hevur fingið økið gjørt byggibúgvið, har er grivið út og planerað.

Síðani Tórshavnar havn fór undir at gera nýggja bátahylin í Álakeri hevur tað tó verið eitt ynski at byggja bátahøllina niðanfyri verandi neyst, heldur enn at byggja vestureftir, tí hettar er nærri við sjóvarmálan. Vísandi til fundir millum partarnar er ein loysn á málinum, at Havnar Róðrarfelag letur inn økið har ið verandi byggiloyvi sambært j.nr. 14/04576-19, tvs. økið vestureftir afturfyri at fáa grundøkið niðanfyri verandi neyst.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Játtan av hesari umsøkn hevur við sær, at broytingar skulu gerast á staðnum (niðurtøka av stuðlamúrum og tí nýggja dráttinum) og samsvarandi figgjarlig eykajáttan skal fáast uppá pláss.
Kostnaðarmeting fyri hesar broytingar er áljóðandi: <u>1.125.000,- Kr u/mvg</u>

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Partar av økinum, sum søkt verður um, er nú útleigað til Róðrarfelagið Knørrur (j.nr. 17/03551-32) og tann leigusáttmálin má broytast áðrenn nýggjur leigusáttmálið til Havnar róðrarfelag verður gjørdur fyri økið

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkjing frá Býðararkitekinum:
Í samb. við at bátahylurin í Álakeri er útbygdur, so var týdningarmikið at útbyggingin somuleiðis tók hædd fyri tí lívið, sum økið og nýggja virksemið leggur upp til. Býarskipanarliga hevur tað verið arbeitt við gøtuni kring Havnina í nøkur ár, og strekkið framvið Álaker er partur av hesum gøturinginum. Í hesum sambandinum, so hevur tað verið týdningarmikið fyri økið, at gøtusambandið verður týðuligt, og at økið leggur upp til uppihald, bæði hjá teimum sum skulu virka í økinum, umframt “gestunum”, sum ganga

framvið økið. Grundað á hetta, so hevur verið arbeitt við gøtuni framvið bátahylinum, og tað varð farið undir at gera eina gonguleið út á grótkastið, umframt at í skipanini av økinum varð lagt upp til, at partur av økinum skuldi gerast til tilhaldsøkið, har møguleiki var at steðga á og njóta økið. Tá Róðrarfelagið Knørrur fekk ávíst økið til teirra bygning, tá varð hetta tilhaldsøkið lagt afturat teirra bygging, soleiðis at tað bleiv inndrigið og lagt væl til rættis í økinum. Um Havnar Róðrarfelag skal hava av økinum, so verður hesin møguleikin til tilhald og hugna helst burtur, umframt at tað verður ein heldur trong smoga aftanfyri bygningarnar, sum einans fer at verða brúkt til parkering og ferðslu. Býarskipanarliga kann man óttast fyri, at ov nógv bygging í økinum ger økið heldur trongt og uttan iva kemur tað at ávirka trivnaðin í økinum, sum annars var ynskiligur at raðfesta við gøtuni framvið bátahylinum, einum tilhaldsøki og eini gonguleið út eftir grótbrotinum.

Tað verður mett týdningarmikið, at bygningarnir samstarva um snið og útsjónd, soleiðis at økið annars verður ein heild heldur enn tveir byggingar, sum á hvør sín hátt royna at markera seg í økinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta Havnar Róðrarfelag økið, ið søkt verður um, við teirri treyt, at núverandi leigusáttmáli um grundøkið undir verandi róðrarneysti (J.nr. 16/01438-14), verður styttur til at fella burtur í seinasta lagi 31. december 2032.

**Havnanevndin 29. august 2022:**

**Ein meiriluti:** Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Tróndur Sigurðsson samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av at ein eykajáttan verður givin og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til leigusáttmála við Havar Róðrarfelag er gjørt, j.nr 22/04383-5.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála við Havnar Róðrarfelag, j.nr. 22/04383-5.

**Havnanevndin 26. september 2022:**

**Ein meiriluti:** Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Birgir Nielsen samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðm og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

# 216/22 Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2022 | 245/22 | 22/04851-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 216/22 | 22/04851-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 27. oktober og aðru viðgerð 24. november.

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2023**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2023 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru tiknar við.

Virksemisbroytingar eru til dømis sáttmála- og lógarbundnar broytingar, ávirkan á rakstrarkostnaðir av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar umframt samtyktar og ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Roknskapur 2021 | Ætlan 2022 | Ætlan 2023 | Broyting 2022/2023 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | tkr | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 900.238 | 920.000 | 957.000 | 4,0% | *37.000* |
| 20601 | Felagsskattur | 63.667 | 35.000 | 30.000 | -14,3% | *-5.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 534 | 2.000 | 1.000 | -50,0% | *-1.000* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 167.889 | 169.386 | 185.000 | 9,2% | *15.614* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.074 | 35.659 | 35.659 | 0,0% | *0* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.168.402** | **1.162.045** | **1.208.659** | **4,0%** | ***46.614*** |
| | | | | | | |
| **Rakstrarútreiðslur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.348 | 96.888 | 101.323 | 4,6% | *4.435* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 285.546 | 300.872 | 313.195 | 4,1% | *12.323* |
| §3 | Børn og ung | 203.387 | 217.381 | 225.072 | 3,5% | *7.691* |
| §4 | Undirvísing | 50.001 | 47.159 | 51.843 | 9,9% | *4.684* |
| §5 | Mentan og frítíð | 71.286 | 62.956 | 64.635 | 2,7% | *1.679* |
| §6 | Teknisk mál | 156.650 | 147.142 | 152.107 | 3,4% | *4.965* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 76.319 | 77.039 | 85.700 | 11,2% | *8.661* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -32.353 | -40.070 | -23,9% | *-7.717* |
| | **Rakstur íalt** | **894.835** | **917.084** | **953.806** | **4,0%** | ***36.722*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.403 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.938 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **20.341** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.226** | **224.961** | **234.854** | **4,4%** | ***9.892*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 176 | 800 | 651 | -18,6% | *-149* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.700 | 4.482 | -21,4% | *-1.218* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -409 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | | -500 | | |
| | **Rentur íalt** | **585** | **6.500** | **5.633** | **-13,3%** | ***-867*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **252.640** | **218.461** | **229.221** | **4,9%** | **10.759** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | 0,0% | *0* |
| | **Avdráttir TH** | | **19.900** | **15.873** | -20,2% | *-4.027* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **251.406** | **197.327** | **212.114** | **7,5%** | **14.786** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **209.704** | **190.574** | **192.899** | **1,2%** | **2.324** |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og metir Ráðið fyri 2023 ein búskaparvøkstur, tvs vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ, upp á 2,6% í leypandi prísum.

Ráðið hevur samstundis saman við Hagstovuni endurskoðað vakstrartølini fyri ávikavist 2021, 2022 og 2023. Fyri 2022, sum Ráðið í fjør metti til 3,3%, er metingin nú 11,2%, sum er ein munandi hækking. Stóra hækkingin er merkt av stóra prísvøkstrinum, ið serliga man standast av krígnum í Ukraina. Ein vøkstur

roknaður út í leypandi prísum er ikki reinsaður fyri prísvøkstur. Mett verður, at prísvøksturin er 7,3%-stig av teim 11,2%'unum.

Hagstovuni vantar enn hetta amboðið - ein BTÚ-deflator - ið kann reinsa BTÚ fyri prísvøkstur, so at vøksturin eisini kann vísast í føstum prísum.

Ráðið sigur annars um føroyska búskapin, at tað framvegis er ferð á. Stóra virksemið hevur við sær lágt arbeiðsloysi og trot á arbeiðsmegi í bæði privat og almenna geiranum. Lønargjaldingarnar eru høgar, og tal av løntakarum higartil í 2022 setir met. Vøruhandilin við útheimin gevur framvegis avlop.

Hækkingin í brúkaraprístalinum fyri til dømis annan ársfjórðing í ár er tó tann hægsta í Føroyum seinastu 14 árini. Fyri at tálma prísvøkstrinum hava miðbankar kring heimin hækkað rentuna. Sum alt annað líka vil tálma nýtsluni hjá húsarhaldunum.

Enn sæst ikki nøkur munandi nýtsluminking her á landi, og flestu húsarhøld sigast av bankunum at vera væl fyri. Men handilsvinnan sigur frá einum minni eftirspurningi av húsbúnaði og marglætisvørum.

**INNTØKURNAR**
Hóast fyrst koronu og síðani kríggið í Ukraina kann sigast, at inntøkurnar hjá kommunni hava verið á einum jøvnum stigi.

Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur varliga.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** fyri 2023 er gjørd við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðar í 2022 og fíggjarætlanartølini síðstu fýra mánaðarnar. Oman á samlaða metta talið fyri 2022 upp á 938 mió.kr eru løgd 2,00%. Inntøkurnar vaksa tá 4,0% ella 37,0 mió.kr upp í 957 mió.kr fyri 2023 í mun til 920 mió.kr, ið var metingin fyri 2022.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** fyri 2023 eru mettar til 185 mió.kr, sum er 15,6 mió.kr ella 9,2% hægri enn metta talið fyri 2022. Fyri 2021 var staðfesta talið 168 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskattuinum** er fyri 2023 mett at verða 30,0 mió.kr, sum er 5,0 mió.kr lægri enn metingin fyri 2022. Staðfesti felagsskatturin fyri 2021 bleiv annars 63,7 mió.kr, um enn metingin var munandi lægri. Men júst felagsskatturin kann vera torførur at meta um, tí botnlinjurnar hjá partafeløgunum eru til dømis nógv tengdar at vøruinnkeypsprísum og søluinntøkum.

**Samlaðu inntøkurnar** í fíggjarætlaninini fyri 2023 vaksa 46,6 mió.kr ella 4,0% upp í 1.208,7 mió.kr í mun til metingina fyri 2022 upp á 1.162 mió.kr.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.000 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum. Av teimum 23.000 eru 21.000 búsitandi í Tórshavn, Hoyvík og Argjum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2021 til august 2022 við 1,7% ella 387 borgarum upp í 23.071 úr 22.684. Hetta er umleið sami vøkstur sum í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,3%.

Seinastu 10 árini er talið av borgarum í Tórshavnar kommunu vaksið 3.309 ella 16,7%. Ein sovorðin vøkstur hevur við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2023 netto 36,7 mió.kr upp í 953,8 mió.kr úr 917,1 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,0% í mun til fíggjarætlanina fyri 2022.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 75% av nettokostnaðunum. Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 29,7 mió.kr ella 4,7% í mun til fíggjarætlan fyri 2022. Í fjør vuksu lønirnar í fíggjarætlanini nakað meira: 32,3 mió.kr ella 4,94% í mun til fíggjarætlan 2021.

Av vøkstrinum fyri 2023 eru 16 mió.kr lønarhækkingar ísv sáttmalar. Harafturat er tað vøksturin í virksemi, ið økir um lønirnar við 13,7 mió.kr.

Sí talvuna niðanfyri.

| | **Grein** *tús.kr* | **Lønar-hækking** | **Lønar-øking** | **Íalt** |
|---|---|---|---|---|
| § 1 | Kommunal fyrisiting | 2.373 | 2.207 | 4.580 |
| § 2 | Almanna- og heilsumál | 7.244 | 3.463 | 10.707 |
| § 3 | Børn og ung | 3.529 | 2.057 | 5.586 |
| § 4 | Undirvísing | 356 | 3.008 | 3.364 |
| § 5 | Mentan og frítíð | 857 | 2.240 | 3.097 |
| § 6 | Teknisk mál | 1.843 | 262 | 2.105 |
| § 6 | Kommunal virkir TK | 909 | 410 | 1.319 |
| | | **17.111** | **13.647** | **30.758** |

## Høvuðsútreiðslutøl á greinunum

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 4,6% ella 4,4 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av sáttmálabundnum lønarhækkingum og virksemisbroytingum í samband við val og valnevndir. Tvey val verða komandi ár.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 4,1% ella 12,3 mió.kr, herav knappar 9 mió.kr er hækking í lønum, ið serliga stavar frá *eldraøkinum*.

*Kommunulæknatænastur* vaksa við 978 tkr, sum er ein hækking á 13,8%.

*Barnavernd* økist 1,05 mió.kr ella 15,6%. *Børn sett heiman í fosturfamliju* hækkar 1,7 mió.kr ella 8,9%. Av hesum er hækking í lønum 0,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* lækkar 1,8 mió.kr, ið er ein hækking á 35%.

*Eldraøkið* stendur fyri størstu hækkingini í upphædd innan almanna- og heilsumál. *Konta 2720 Heilsuhúsið* hækkar 1,3 mió.kr svarandi til eina hækking á 3,6% orsakað av hægri prísum. *Konta 2721 Røktartænastur* hækkar 7,1 mió.kr svarandi til eina hækking á 4,5%, øll upphæddin er lønir. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 1,6 mió.kr, ið er ein hækking á 4,0%, alt lønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 7,7 mió.kr ella 3,5%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 4,6 mió.kr ella 2,8%. Barnatalið minkar við 15 í vøggustovunum, 55 í barnagørðunum og 112 fleiri børn í frítíðarskúlunum. Lagt er ikki upp fyri nýggjum útreiðslum til møguligt hægri barnatal. Fleiri forskúlatilboð verða eftir summarið 2023, og tí verður ein forskjóting ímillum grein 3 og 4 eins og ímillum barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn til forskúla.

Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslurnar til systkinaavsláttur* økjast 845 tkr ella 5,6% mett út frá útreiðslunum í 2022.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 4,7 mió.kr ella 9,9%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Nýggir forskúlar eru skipaðir frá sumrinum 2023 í Eysturskúlanum, Velbastaðar skúla, Kollafjarðar skúla og Kaldbaks skúla. Harumframt eru broytingar í lønum til skúlaleiðarar í hesum skúlum í samband við við forskúla. Játtan til reingerð er stillað hjá Skúlanum á Fløtum og Eysturskúlanum. Eisini eru stovningarútreiðslur í samband við nýggjar 8. flokkar í Santa Frans skúla. Játtanin til frítíðarskúla til forskúla hækkar, samstundis sum játtanin til barnagarðsstovur hækkar samsvarandi barnatalinum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** hækka 1,7 mió.kr ella 2,7%. Største broytingin er hækkingin av játtanini til *kontu 5717 Ítróttaranlegg* á 10,5% ella 1,6 mió.kr, mestsum alt lønir. Játtanin til Kvøldskúlan hækkar 610 tkr ella 14,9% ísv økta undirvísing í føroyskum sum annað mál.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 3,4% ella 5,0 mió.kr. *Konta 6110 Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað* hækkar 1,5 mió.kr ella 4,6% orsakað av hækkaðum fermetrartali í ítróttarhallum. *Kontan 8114 Kavarudding* hækkar 1,7 mió.kr ella 51,8% í tráð við søguligan kostnað fyri hvønn frostdag og tal av frostdøgum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir, frároknað Tórshavnar havn** økjast við 11,2% ella 8,6 mió.kr. *Konta 7110 Renovatión* veksur 21,3% ella 5,0 mió.kr. Talan er um eina resthækking vegna árligt gjald ísv tyrving á Nýggjheiðum í Kvívík. Eisini er mist inntøka á 600 tkr. *Konta 7510 Bussleiðin* hækkar 2,8 mió.kr samsvarandi nýggjum sáttmála og 2,5 mió.kr ov lítið búskettera í 2022.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 234,9 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 229,2 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 192,9 mió.kr.

Lániskuldin hjá kommununi er 242 mió.kr. Av hesum eru 233 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Skjøl**
Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2022:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt.

## 217/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 215/22 | 22/00009-1 |
| 12 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 192/22 | 22/00009-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 243/22 | 22/00009-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 217/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |